FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.tinganes.fo

# RØÐA LØGMANS

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Harra formaður, góðu føroyingar!**

Trivnaður! Tryggleiki! Vøkstur!

Hetta verður stavnhaldið, nú Føroyar aftur fara upp í fulla ferð.

Vit skulu halda fast um tryggleikan, kveikja trivnaðin og áhaldandi skapa vøkstur í landinum.

***

**Harra formaður!**

Seinastu tíðina hava vit sæð eina lýsing:

“Ein maður. Ein dreymur. Eitt mál.”

Maðurin er Sverri Sandberg Nielsen úr Miðvági, sum í hesum døgum bjóðar heimselituni av í kappróðri á Olympisku leikunum í Tokyo.

Tá ið Sverri vann EM-gull, varð hann heiðraður í heimbygdini. Langa rekkjukoyringin vísti, at nógv stóðu saman við føroyska evropameistaranum.

Sverri segði sjálvur soleiðis:

“At allar Føroyar kunnu vera við, og at øll bygdin kemur og feirar tað saman við mær, tað betýðir øgiliga nógv.”

Tí tað betýðir nakað fyri okkum menniskju – fyri trivnaðin – at onnur eru har.

Sverri Sandberg Nielsen lutaði fegin føroyingum burtur av sigrinum. Og akkurát hetta – at vit luta øðrum burturav, tá ið tað gongst okkum væl – og at onnur rætta okkum eina hond, tá ið á stendur – hevur altíð verið partur av føroysku fólkasálini.

Hetta skal eisini síggjast aftur í politikkinum. Í tí, vit gera fyri trivnað, tryggleika og vøkstur.

**Harra formaður!**

Ein av fremstu fortreytunum fyri trivnaði er at hava trygt tak yvir høvdið. Í Føroyum hava fólk altíð bygt síni egnu hús. Tað gera tey framvegis. Men seinastu árini hava mong havt torført við at finna hóskandi heim.

Tí fegnist eg um, at privatar fyritøkur eisini taka ábyrgd við at byggja sethús og íbúðir. Hetta er við til at breiðka um bústaðarmøguleikarnar.

Hartil er ein bústaðarpakki samtyktur, sum eg vænti verður ein vælferðarpolitiskur varði.

Bústaðir hava fingið út móti hálvari milliard at byggja fyri komandi árini. Av hesum skal umleið helvtin brúkast til at fíggja búfelagsskapir til fólk við serligum tørvi, barnaverndarstovnar og lestrarbústaðir.

Restin skal – saman við íleggjarum – fíggja vanligar íbúðir.

Tað vísir seg at vera ójavnt, hvussu lætt tað er at fáa fígging til ein bústað á bygd í mun til ein bústað í miðstaðarøkinum. Her skal ein loysn finnast – helst saman við peningastovnunum.

Vaksandi áhugin hjá útlendingum at keypa hús her í landinum órógvar eisini. Men hesi viðurskiftini verða nú skipað soleiðis, at útlendingar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, skulu søkja um loyvi at keypa.

Ein hóskandi javnvág má finnast.

Ein hóskandi javnvág má eisini finnast innan samferðsluna.

Samferðsla verður ofta lýst sum eitt hart virði, men eg havi hug at bjóða hesum av.

At binda samfelagið saman er eisini eitt bleytt virði, tí tað økir sanniliga um bæði trivnað og trygd.

Vit vilja stytta um innlendis teinarnar fyri at økja um møguleikarnar.

Tí binda vit nú samfelagið saman við tunlum. Seinastu fyrireikingarnar til Suðuroyartunnilin verða gjørdar komandi ár. Væntandi verður koyrandi úr Sumba til Viðareiðis áðrenn 2030.

Tá ið vit tosa um samferðslu, røkir Strandferðslan eina lívsneyðuga uppgávu.

Men vit vilja betra og broyta samferðsluna kring oyggjarnar – eisini útoyggjarnar. Tí fara vit at eftirmeta og nágreina, júst hvørjar tænastur Strandferðslan skal veita frameftir.

**Harra formaður!**

Tað er ymiskt, hvat fær okkum at trívast. Men fyri flestu okkara hevur familjan nógv at siga.

Hetta summarið gjørdist eg abbi fyri fyrstu ferð. Tað er stórt at síggja, hvussu lívið heldur fram, og hvussu ættarlið leggjast afturat.

Og tað eru jú børnini – komandi ættarliðini – sum er okkara høvuðsábyrgd.

Tey eru orsøkin til, at vit skulu varðveita tað góða og trygga samfelagið.

Skulu nýggju ættarliðini trívast, skulu vit geva familjunum bestu fortreytir.

Eg eri fegin um, at vit hava longt barnsburðarfarloyvið fýra vikur, so at foreldur nú kunnu vera um barnið í eitt heilt ár. Hetta er besta byrjanin, vit kunnu hugsa okkum.

Í dag fara flestu børnini á stovn. Vøggustovu- og barnagarðsárini hava stóran týdning fyri trivnað og tryggleika hjá børnum og foreldrum. Vit vilja tryggja børnum undir skúlaaldri bestu umstøður til at læra og búnast.

Men tó at umstøðurnar kunnu vera góðar, vita vit, at lagnan rakar ójavnt. Eisini børnini.

Tað kann til dømis kennast ótrygt hjá børnunum, tá ið foreldrini fara hvørt til sítt. Í løtuni endurskoða vit lógina um foreldramyndugleika, tí allar avgerðir skulu takast til barnsins besta. Teirra rættindi skulu styrkjast, og vit skulu lurta eftir børnunum.

Vit vita tó, at vit ikki fáa vart tey frá øllum, og tí eiga vit at gera alt fyri at hjálpa.

Til dømis teimum ungu, sum stríðast við sálarligan ampa.

Vit hava sett í verk eina royndarskipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð og hjálp til ung. Skipanin er longu nógv brúkt, so tørvurin er stórur.

Tørvurin á hjálp er eisini stórur hjá teimum, ið falla fyri rúsevnum. Rúsevnismisnýtsla man vera eitt tað ringasta, vit kunnu ímynda okkum fyri tey ungu.

Tí vilja vit fyribyrgja rúsevnismisnýtslu. Her koma góðir felagsskapir inn í myndina, tí børn og ung, sum trívast og eru partur av einum góðum felagsskapi, freistast ikki líka lætt.

Ein heildarætlan um at fyribyrgja rúsevnum er í umbúna. Hon lýsir, hvussu vit best lofta ungum, sum eru á veg út í trupulleikar.

Hartil mugu vit eisini hjálpa teimum, sum longu eru blivin bundin. Tey skulu hava bestu hjálpina.

Skulu vit trívast, krevst eisini, at vit sleppa at gagnnýta og menna okkara evni. At vit fáa hóskandi avbjóðingar og møguleikar.

Tí leggur landsstýrið stóran dent á at nútíðargera fólkaskúlan og útbúgvingarøkið.

Vit endurskoða fólkaskúlalógina, dagføra tíma- og lærugreinabýtið og raðfesta arbeiðið hjá flokslæraranum.

Trivnaðurin í fólkaskúlanum skal eisini raðfestast, tí tá ið eitt barn ikki trívist, verður verri at læra.

Eisini framhaldsútbúgvingar skulu mennast.

Ung við sálarligum avbjóðingum skulu hjálpast til at megna eina miðnámsútbúgving, og serbreytin á miðnámi skal bjóðast út fleiri staðir. Tað verður eisini gott, tá ið Rásin verður liðugt útbygd og fer at kunna taka 14 næmingar inn árliga.

Tørvur hevur verið á undirvísing til teirra, sum hava føroyskt sum annað mál. Men tilfar og undirvísing er nú ment, og saman við Setrinum fyrireika vit harumframt eina eftirútbúgving í føroyskum sum annað mál. Hon byrjar longu í heyst.

Hægri útbúgvingar hava við sær menning og trivnað og er besti møguleikin til at varðveita ungdómin her heima. Tí skal Fróðskaparsetrið støðugt mennast. Góðskan skal áhaldandi eftirmetast og tryggjast soleiðis, at okkara universitet kann fáa altjóða góðkenning og viðurkenning.

Eisini yrkisútbúgvingarnar skulu mennast. Millum annað er ein nýggj alaraútbúgving á veg, umframt ein útbúgving fyri handverksmeistarar.

**Harra formaður!**

Mentanin bindur okkum saman og fær okkum at trívast. Tilboðini eru mong, og tað legst støðugt afturat.

Leingi hava vit bíðað eftir einum tjóðleikhúsi, og ferð er nú endiliga komin á arbeiðið. Tjóðleikhúsið verður á Bursatanga í Havn, og í næstum skal støða takast til, hvussu byggjast skal.

Eisini ítróttarmentanin er sterk. Í flest øllum ítróttargreinum er framgongdin øgilig, og vit síggja, at um ítróttin fær røttu sømdir, standa føroysk ítróttarfólk einki aftan fyri onnur.

Og ítróttin snýr seg ikki bara um avrik, men eisini um felagsskap. Tí er umráðandi, at vit saman við vinnuni støðugt stuðla ítróttini.

Í løtuni stuðla vit øll Sverra Sandberg Nielsen.

Best, sum hann fyrireikaði seg til Olympisku leikirnar, varð hann – sum so mangur – raktur av koronu. Hetta tarnaði honum sjálvsagt, men so skjótt tað var ráðiligt, setti miðvingurin fulla ferð á, og brátt gingu árarnar aftur kykar í single-scullaranum.

**Harra formaður!**

Føroyar eru millum tey londini, sum eru komin frægast gjøgnum koronukreppuna.

Ikki tí. Eg veit, at vit ikki hava verið lýtaleys. Nógv hava merkt sváran sakn. Fleiri hava mist nógv. Hjá flestu okkara hevur trivnaðurin verið ávirkaður.

Kortini hava fleiri lond leitað sær íblástur í Føroyum til at basa smittuni – og nú nærkast floksimmuniteturin í hvørjum. Øll hava fingið koppsetingina í boði, og tað er nú ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum at verja seg og onnur.

Vit nærkast aftur einum vanligum gerandisdegi, og málið er, at vit – eins og Sverri Sandberg Nielsen – skjótt kunnu seta fulla orku og fulla ferð á samfelagsárarnar aftur.

Fyri at fáa neyðugu floksverjuna hevur tað týdning, at flest gjørligt verða koppsett. Tað er ríkiligt av koppingarevni, so tað er bara at halda seg framat. Floksverjan skal vera so sterk sum gjørligt, tá ið full ferð aftur kemur á samfelagið.

Vanligi gerandisdagurin er í eygsjón. Hann gleða vit okkum øll til.

**Harra formaður!**

Eingin, sum er ótryggur, trívist. Tí er tryggleiki eisini ein sjálvsagdur partur av okkara stavnhaldi. Vit vilja varðveita Føroyar sum eitt av heimsins tryggastu londum.

Í fluttari merking skulu vit vera í einum góðum bjargingarvesti, um eitt óløgi brádliga skuldi tikið okkum út á sjógv.

Til dømis skulu vit, tá ið sjúka rakar, hvíla trygt í vissuni um, at vit fáa bestu hjálpina. Tað er avgerandi fyri einstaka menniskjað, fyri tey avvarðandi og fyri alt samfelagið. Ómetaliga virðið á heilsuni er orsøkin til, at allur heimurin í hálvtannað ár hevur ligið og andøvt. Tað er orsøkin til, at vit brúka stóran part av skattainntøkunum til heilsubót.

Landsstýrið hevur lagt nógv fyri á heilsuøkinum. Vit hava millum annað fingið skjótari útgreinan fyri demens, víðkað virksemið við MR-skannara, og vit hava hækkað játtanina til ADHD viðgerðarstovu.

Og vit hava stórar ætlanir komandi árini.

Ein er nýggja diabetesmiðstøðin. Saman við Novo Nordisk grunninum vilja vit geva diabetikarum betri viðgerð.

Góð viðgerð krevst somuleiðis, tá ið vit av ymsum orsøkum missa førleikar. Tí fáa hesi nú fleiri nýggj tilboð um at endurvenja og endurmenna seg.

Endurvenjingin er vegurin inn aftur í lívið.

Tá ið sjúka er staðfest, ræður um at fáa skjóta viðgerð. Við viðgerðartrygdini skal eingin bíða eftir viðgerð longur enn 30 dagar. Tað gongur rætta vegin, og á fleiri økjum er málið longu rokkið.

**Harra formaður!**

Eitt er heilsa og tryggleiki hjá tí einstaka.

Men vit arbeiða eisini yvirskipað við tryggleika – serliga nú stórveldini sýna Norðuratlantshavi áhuga, og nú støða skal takast til nýggja lofteftirlitsradaran. Við eitt er trygdar- og verjupolitikkur aftur vorðin ítøkiligur her heima.

Samskiftið við danskar myndugleikar um radaran hevur verið gott. Tað eru semjusøkjandi tíðir í ríkisfelagsskapinum. Øll trý londini vilja finna skilagóðar loysnir – eisini á uttanríkispolitiska økinum, har ríkisfelagsskapurin má dagførast. Tí er eitt samstarvsráð stovnað, sum skal viðgera uttanríkis-, trygdar- og verjumál.

Okkum tørvar sterkari samstarv og betri samskipan innanríkis fyri at tryggja frið og lágspenning, nú stórveldini eru úti um seg.

Landsstýrið arbeiðir støðugt við at beina burtur forðingar millum Føroyar og Danmark.

Á nýggjárinum varð sett í verk ein skipan, sum tryggjar føroyingum møguleika at fáa danskt CPR-nummar. Hon er sera væl móttikin og ger tað nógv smidligari og tryggari at avgreiða viðurskiftini við danskar lærustovnar og donsk sjúkrahús.

**Harra formaður!**

Føroyski búskapurin er tryggur. Landskassin er søguliga væl fyri, tí skuldin er lítil.

Landskassin hevði hall í fjør, og væntandi verður aftur hall í ár.

Men málið er greitt. Vit skulu hava avlop aftur í 2023. Avlopið skal síðani vaksa, so tað kann brúkast til at minka um skuldina og til at standa ímóti við, tá ið verri tíðir koma.

**Harra formaður!**

Tryggleiki merkir ikki, at vit sleppa undan bakkøstum. Hóast tú hevur bjargingarvest, kanst tú kortini verða sligin út.

Tryggleiki merkir, at vit royna at fyribyrgja, at bakkøstini henda, og at vit – tá ið kortini illa vil til – gera alt fyri at hjálpa.

Til dømis fara vit nú at seta í verk eina skipan við sorgarfarloyvi. Soleiðis kunnu foreldur, sum missa barn yngri enn 18 ár, syrgja í friði uttan at stúra um mista inntøku.

Tey, sum gerast langtíðarsjúk, mugu tryggjast betur. Tí leingja vit tíðarskeiðið, har tú kanst fáa dagpening. Hetta er eitt stórt framstig.

Somuleiðis mugu vit tryggja, at lív og heilsa ikki verða sett í váða orsakað av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum. Vit skulu virða verkfallsrættin, men verandi støða er ikki haldgóð. Her skal ein betri loysn finnast.

***

Landsstýrið hevur eisini bøtt um fíggjarliga tryggleikan hjá pensjónistum.

Bara tær broytingar, sum vit hava gjørt seinastu tvey árini hava við sær, at pensjónistar í dag hava 1200 kr. meir at liva av um mánaðin.

Tey, ið vilja halda fram at arbeiða eftir pensjónsaldur – antin í fullum starvi ella partstíð – skulu hava møguleikan.

Vit hava lækkað munandi um mótrokningina fyri arbeiðsinntøkuna hjá pensjónistunum. Tí tað skal loysa seg at arbeiða, eisini sum pensjónistur.

***

Tryggleiki snýr seg um at vita, at tað er rúm fyri okkum. Eisini, um vit snáva á leiðini.

Tí mugu vit bøta um fongsulsviðurskiftini í Føroyum. Hesi eru ikki nøktandi. Vit skulu hava eitt tíðarhóskandi fongsul, har til ber at mennast og útbúgva seg.

Eg haldi bestu loysnina vera at byggja nýtt fongsul, ið nøktar tørvin.

***

Sverri Sandberg Nielsen er komin so langt við rógvingini, tí hann støðugt spyr seg sjálvan:

“Hvussu kann eg gerast uppaftur betri? Hvussu kann eg vaksa, og hvussu kann eg vaksa á rættan hátt?”

Allir úrmælingar mugu leggja til rættis, skynsamt og umhugsað, hvussu tey skulu vaksa; soleiðis, at tey avrika best eftir egnum evnum og í kapping við onnur.

Sama er við samfelagnum.

Orðið “vøkstur” verður ofta brúkt, mest sum upp á gjøt, uttan at hugsað verður um, hvat tað merkir.

Tá ið eg tosi um vøkstur, skulu tvær treytir lúkast.

Fyri tað fyrsta má vøksturin vera burðardyggur.

Vit skulu stuðla upp undir virksemi, sum ikki bara skapar vøkstur her og nú, men har virðini eru varandi. Er tað ikki burðardygt, er tað ikki veruligur vøkstur.

Fyri tað annað má vøkstur altíð vera eitt amboð at røkka einum hægri endamáli. Í Føroyum skulu vit skapa burðardyggan vøkstur, tí vit skulu varðveita og styrkja vælferðina í landinum.

Við fríari kapping skapa vit størsta framburðin og fleiri møguleikar til fólkið, ið her býr. Við virknari kapping fáa vit bestu og bíligastu tænasturnar. Um ein fyritøka tekur ov høgan prís, bjóðar ein onnur av. Tað síggja vit eitt nú í fíggjarheiminum, har fakfeløgini umhugsa ein fakfelagsbanka, nú teirra limir skulu rinda meira.

Ein forðing fyri vøkstri er ovurhondsstóri tørvurin á arbeiðsmegi, sum flest allar vinnugreinar síggja. Vit fara at gera tað smidligari at fáa arbeiðsmegi uttanífrá, nú okkum vantar fólk á so nógvum økjum.

**Harra formaður!**

Tað er vælferðin, sum veitir okkum trivnað og tryggleika.

Við hesum í huga havi eg sett eitt Vakstrarforum, ið skal eyðmerkja mest uppløgdu vakstrarøkini og soleiðis styrkja vælferðina og trivnaðin. Vakstrarforumið skal vísa á, hvørjar førleikar vit kunnu gagnnýta í kappingini við onnur, og higartil eru fimm øki eyðmerkt.
Tað fyrsta er havið. Vit kunnu útvega milliónum heilsugóðan mat, samstundis, sum vit vaksa.

Fyri tað annað eiga vit at leggja størri dent á kunningar- og samskiftistøkni.

Eitt triðja vakstrarøki eru maritimar tænastur.

Fjórða økið er ferðavinnan.

Fimta økið er tilfeingið. Her hugsa vit helst fyrst um stertar. Men týdningarmesta tilfeingið eru gløggu høvdini og royndu hendurnar. Tí eru eisini útbúgving og arbeiðsmarknaður uppløgd vakstrarøki.

Yvirskipað skulu vit fáa greiðu á, hvat vit duga best, og hvussu vit vinna kappingina við onnur. Vit hava longu greiðar fyrimunir. Tí vit eru væl útbúgvin, arbeiðssom og skapandi. Og vit hava stórt álit hvør á øðrum.

Vit hava eisini stórt álit á vinnuni.

Alivinnan finnur støðugt nýggjar vakstrarvegir. Vit vilja geva henni fleiri møguleikar við at ala á landi og til havs. Í løtuni verður arbeitt við at finna best skikkaða havøkið eystan fyri Føroyar.

Umstøðurnar at ala tara eru somuleiðis í heimsflokki, og fyrstu loyvini til vinnuliga taraaling vórðu latin í fjør.

Tarin veksur skjótt og er av bestu dygd í okkara reina sjógvi.

Reini sjógvurin gevur okkum eisini fyrstafloks fisk. Men skal fiskivinnan vaksa, krevjast tryggir og støðugir karmar. Tað hevur hon nú. Tí síggja vit stórar íløgur í framkomin skip, ið gera høvuðsvinnuna burðardyggari.

Leisturin fyri veiðigjald er lagdur, ið leggur upp fyri sveiggjum í fiskaprísi og fiskiskapi.

Eisini er skattur settur á veiðuloyvi, ið verða endaliga seld. Tað skal loysa seg at vera í vinnuni, og selur tú teg úr vinnuni, kemur vinningurin samfelagnum til góðar.

Men veiðuloyvini eru einsamøll ikki trygd fyri fiskiskapi. Hjá heimaflotanum hevur fiskiskapurin verið lakur í langa tíð. Vit royna stútt og støðugt at útvega heimaflotanum fleiri rættindi.

Í løtuni er eingin avtala um rættindini til makrelin. Brexit ger samráðingarnar truplari. Føroyar og Noreg hava ásett sína egnu makrelkvotu í ár, men eg vóni, at strandarlondini finna eina breiða semju sum skjótast, tí vit skulu hava burðardygga veiðu í øllum liðum.

**Harra formaður!**

Í einum veiðisamfelag sum okkara hevur kunnleiki um veðrið altíð havt stóran og mangan lívbjargandi týdning.

Í mong ár hava vit litið á veðurtænastur í grannalondunum. Nú er føroyska veðurtænastan farin til verka, og tað fer at geva okkum neyvari forsagnir.

Veðurvánirnar skulu miðlast betur, og veðurtænastan skal gera tað møguligt at samstarva um altjóða veðurlagsgransking.

Samstarv gagnar eisini útflutninginum, og nú vilja vit hava fríhandilssáttmálar við eitt nú Kina, Russland, Japan og Suðurkorea.

Vit eru í løtuni í holt við at styrkja munandi um okkara samstarv við ES. Hetta fer bæði at bøta um handilsviðurskiftini og styrkja samstarvið á øðrum økjum.

Fyri nøkrum døgum síðani sendi eg Ursulu von der Leyen, ES-nevndarforsetanum, okkara uppskot, og eg vænti, at vit skjótt koma á mál.

Samstarvið við USA verður eisini styrkt – bæði í sambandi við vinnu, gransking, útbúgving og mentan. Vit menna samstarvið í sátt og semju.

Semja má eisini finnast ímillum ferðavinnu og landbúnað her heima.

Ógreiða støðan, sum valdar í løtuni, tænir ikki Føroya umdømi uttanlands – og skapar ósemjur innanlands.

Neyðugt er tí við nýggjari lóg, sum bæði hevur atlit at landbúnaði og lokalum vinnumøguleikum, men eisini tryggjar ferðavinnuni menningarmøguleikar.

**Harra formaður!**

Tá ið vit tosa um vøkstur, er neyvan nakað, sum hevur størri týdning, enn at økja grønu orkuna. Vit hava orðað uppskot til nýggjan orku- og veðurlagspolitikk, sum við 25 ítøkiligum átøkum skal tálma oljunýtsluni.

Tað skulu stór tøk takast í orkuframleiðsluni, og her skulu fleiri til at bera byrðarnar. Tað krevst tó fult gjøgnumskygni, skulu vit tryggja neyðugu kappingina og menningina á orkuøkinum. Í løtuni arbeiða vit saman við SEV um at finna bestu loysnina. Arbeiðið er komið væl áleiðis, og vit leggja nýggja lóg fyri Tingið í heyst.

**Harra formaður!**

Róðrarkempan úr Miðvági, Sverri Sandberg Nielsen, hevur ongantíð dult fyri, at málið var eitt heiðursmerki.

Men sama hvussu líður eftir, hevur hann longu verið okkum ein fyrimynd. Við at droyma stórt og umseta dreymin til ítøkiligt mál. At arbeiða hart og ongantíð taka eyguni av málinum. At trúgva á egin evni og síggja seg líka góðan sum kappingarneytarnir.

Í lýsingini um hann falla orðini soleiðis:

»Skotið er latið, og fyrsta takið er tikið.

Nú ræður um at spenna fót í bekk, tí nú telur hvørt einasta tak.

At gera dreym til veruleika og verða heimsins besti rógvari.«

Sama kundi verið sagt um føroyska samfelagið, nú vit – eftir at hava andøvt í hálvtannað ár – aftur spenna føtur í bekk og seta á.

Latum okkum finna góða áralagið, gera dreym til veruleika og skapa eitt samfelag í serflokki við trivnaði, tryggleika og burðardyggum vøkstri sum stavnhaldi.

Góða ólavsøku, øll somul!

Gud signi Føroyar.

Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNAR- OG LÓGAMÁL

**Ríkisfelagsskapurin**

Kós er sett ímóti nýggjum og meira semjusøkjandi tíðum í ríkisfelagsskapinun. Tað verður tosað opið og alment um tær avbjóðingar, ið eru. Øll trý londini vilja finna skilagóðar loysnir. Eisini á uttanríkispolitiska økinum, har neyðugt er at dagføra og endurskapa ríkisfelagsskapin í tíðarhóskandi útgávu.

Nýtt samstarvsráð við løgmanni á odda er stovnað, sum á hvørjum ári skal viðgera uttanríkis-, trygdar- og verjumál. Samstarvsráðið er stovnað, tí tørvur er á sterkari samstarvi og betri samskipan, nú stórveldini vísa vaksandi áhuga fyri Norðuratlantshavi.

Eitt mál, sum nýggja samstarvsráðið hevur tikið upp, er 5G netið, og hvørjar trygdarpolitiskar avbjóðingar liggja í tí. Støðan hjá flestu londum í vesturheiminum er greið. Bæði NATO og ES eru á einum máli um, at undirstøðukervið á fjarskiftisøkinum eisini er ein spurningur um trygdar- og verjupolitikk. Av tí at fjarskifti er eitt yvirtikið málsøki, skal støða takast til, hvussu nýggja lóggávan skal verða sett í verk. Aðalmálið við lóggávuni er greitt – okkara undirstøðukervi skal vera trygt.

**Vakstrarforum**

Løgmaður hevur skipað eitt vakstrarforum fyri at eggja til virðisøking í siðbundnu vinnunum og alternativum framtíðarvinnum í Føroyum á burðardyggari grund. Fyritreytin fyri at tryggja framtíðar vælferðina er burðardyggur vøkstur.

Í Vakstrarforumi eru fólk við servitan úr m.a. ymsum vinnugreinum, arbeiðsmarknaði, gransking, íverksetan, orku, burðardygd. Landsstýrismenninir í fíggjarmálum, umhvørvis- og vinnumálum og uttanríkis- og mentamálum eru eisini fastir limir í Vakstrarforumi. Onnur landsstýrisfólk eru við, tá teirra málsøki verða viðgjørd.

Higartil hevur Vakstrarforum tikið fram 5 øki, sum serstakir arbeiðsbólkar skulu arbeiða víðari við: havið, kunningar- og samskiftistøkni (KST), útbúgving og arbeiðsmegi, maritimar veitaravinnur og ferðavinnu.

Vakstrarforum er tíðaravmarkað til hálvt annað ár. Ein samanhangandi frágreiðing verður liðug á sumri 2022.

**Stýrisskipanarlógin**

Í seinastu løgmansrøðu varð nevnt, at tíðin er búgvin til at endurskoða fleiri tættir í stýrisskipanarlógini, og at málið má síggjast í eini heild heldur enn, at einstakar broytingar verða gjørdar fyri seg. Umframt heitini á løgtings- og landsstýrismonnum er serliga hugsað um fíggjarmálsviðurskifti, millumtjóðaviðurskifti, uppgávubýti millum løgtingsumboðsmannin og landsstýrismálanevndina, valrætt til ómynduggjørd, kommunuviðurskifti og um rættarliga og politiska ábyrgd av teim málum, sum løgd eru til sjálvstøðugar nevndir, ið taka endaligar avgerðir.

Farna árið hava fundir verið um málið bæði innanhýsis í landsstýrinum og við floksformenninar á Tingi. Hildið verður fram við hesum arbeiði. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

**CPR til føroyingar**
Á nýggjárinum varð við lóg sett í verk ein skipan, har føroyingar kunnu fáa danskt CPR-nummar frá Ríkisumboðnum. Og tey, sum hava CPR-nummar, annaðhvørt frá Ríkisumboðnum ella í Danmark, kunnu eisini fáa útflýggjað NemID frá Ríkisumboðnum.

Skipanin er ætlað til samskiftið við stovnar uttan fyri landoddarnar. Tað er ein sannroynd, at føroyingar bæði í Føroyum og í Danmark ofta eru fyri tí at skula hava onkra tænastu frá donskum stovni, t.d. sjúkrahúsverkinum í Danmark, upptøku á danskar lærustovnar ella avgreiðslu í sambandi við lønarviðurskifti mótvegis lønarútgjaldsstøðum, sum eru í Danmark. Við at hava eitt CPR-nummar og kanska eitt NemID, áðrenn flutt verður til Danmarkar, kann tilgongdin gerast nógv smidligari.

1.232 fólk hava fingið sær CPR-nummar og 1.830 Nem-ID (25. juli 2021).

**Styrkt samband millum land og kommunur**
Kommunufelagið og landsstýrið settu í vár sjøtul á eina tilgongd til tess at samskifta og samstarva betur um tey mál og tær avbjóðingar, ið krevjast fyri at bøta um umstøðurnar hjá borgarunum og samfelagnum sum frá líður.

Nógvar avbjóðingar eru, harímillum stóra trotið á starvsfólkum á vælferðarøkinum, heimild til kommunurnar at áleggja tænastugjøld, lættari atgongd til byggilendi í størru kommununum, bygnaðurin á orkuøkinum og mangt annað.

Partarnir hava avtalað at hava tríggjar høvuðsfundir um árið fyri at tryggja, at týðandi mál verða loyst, og at partarnir kunnu hava eina felags fatan av støðuni.

**Stokkastovan umvælast**
Arbeiðið at umvæla Stokkastovuna í Tinganesi er farið í gongd. Tað er liður í heildarætlan at umbyggja og umvæla Tinganes.

Løgtingið hevur í 2021 játtað, at brúkast kunnu upp til 6,5 mió. kr. til arbeiðið, sum væntast at vera liðugt í 2024.

Tilfar til nýggjar stokkar eru 150 ára gomul granntrø úr Noregi, ið vórðu feld í mai í ár. Stokkarnir verða førdir til Føroya í ár og goymdir, so teir eru tøkir tíðliga næsta ár. Grundin verður eisini umvæld, húsini verða styrkt, og flag verður lagt á tekjuna.

Verkætlanin verður framd í samstarvi við norska ríkisantikvarin, universitetið í Göteborg og svenskar handverkarar, sum eru serfrøðingar í tílíkum umvælingum. Føroyskir handverkarar verða eisini við í arbeiðinum.

Ætlanin er, at almenningurin skal hava møguleika at fylgja arbeiðinum bæði á staðnum og við kunnandi tilfari, sum verður tøkt á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.

Heildarætlan fyri umbygging í Tinganesi varð gjørd í 2009 og er nú dagførd við teimum umvælingum, sum eru framdar, og nýggjum kostnaðarmetingum.

**Fongsulsviðurskifti**
Tað hevur leingi verið greitt, at fongsulsviðurskiftini í Føroyum als ikki eru nøktandi. Tí hevur løgmaður heitt á danska løgmálaráðharran um at fáa umstøðurnar á fongulsøkinum munandi betrað. Eisini spurningin um at byggja nýggjan arrest- og fongsulsbygning í Føroyum.

Síðani er arbeiðsbólkur settur við føroyskum og donskum embætisfólkum at greina, hvussu fongsilsviðurskiftini kunnu betrast við umvæling av Mjørkadali ella við nýbygging.

Frá landsstýrisins síðu verður dentur lagdur á, 1) at talið av avbyrgingum skal lækka, 2) at tað skal bera til at hýsa teimum, sum skulu sita dóm meir enn 1 ár í Føroyum, 3) at varðhaldsfangar og innsett skulu vera skild sundur, 4) at tað skal bera til at halda samfangar sundurskildar, 5) at ung ikki skulu sita saman við vaksnum fangum, 6) at neyðug tilboð viðv. arbeiði, undirvísing, viðgerð o.ø. skulu vera møgulig, meðan sitið verður, og 7) at útslúsingartilboð í sambandi við leyslating verða skipað. Yvirskipað er ført fram, at føroyingar eiga at sita dóm í Føroyum og ikki verða sendir til Danmarkar. Víst er eisini á, at hvørki bygningurin ella staðsetingin í Mjørkadali eru hóskandi til fongsul. Tí eigur nýtt fongsul, ið eisini nøktar framtíðartørv, at verða bygt.

Frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum skal vera liðug í heyst. Hon verður partur av fyrireikingunum til eina komandi fleiráraavtalu fyri kriminalforsorgina, sum verður gjørd millum politisku flokkarnar á Fólkatingi í seinasta lagi við árslok.

**Útlendskur ognarskapur av fastognum**
Seinastu árini hevur áhugin ímillum útlendingar at keypa fastogn í Føroyum verið vaksandi. Hóast vit ikki síggja munandi vøkstur av sølu til útlendingar enn, hevur landsstýrið avgjørt at skipa økið við løgtingslóg.

Skipanin fer at leggja upp til, at øll, sum búgva fast í Føroyum – uttan mun til tjóðskap – kunnu keypa fastogn uttan at søkja loyvi frammanundan. Henda loyvisskipan fer at hava við sær, at persónar ella feløg, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, og sum heldur ikki hava búð í landinum í samanlagt 5 ár, skulu søkja landsstýrið um loyvi at keypa ella á annan hátt ogna sær fastogn í Føroyum.

Landsstýrið vil finna eina javnvág millum, at útlendingar hava rímiligan møguleika at keypa fastogn í landinum, og tað, at útlendskur ognarrættur til fastogn í Føroyum ella í ávísum økjum í landinum ikki verður ov stórur. Nýggja lógin skal ikki seta óneyðugar forðingar fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum.

Uppskot til løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum er gjørt og hevur verið til ummælis hjá viðkomandi pørtum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið eftir ólavsøku.

**Heildarætlan um at tálma rúsevnismisnýtslu**
Í seinastuni hava vit hoyrt um fleiri grov rúsevnismál, og tað tykist, sum málini eru vorðin fleiri og grovari. Landsstýrið metir støðuna álvarsliga og vil tí finna skilagóðar loysnir fyri at fyribyrgja slíkum málum í framtíðini.

Løgmaður hevur tí sett arbeiðsbólk at gera uppskot til heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin tosað við meira enn 50 partar, sum hava serstaka vitan og royndir um útbreiðslu av rúsevnum, og hvussu vit best fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu.

Breið semja er um, at besti mátin at tálma nýtsluna av rúsevni er at fyribyrgja, at nakar fer at nýta rúsevni. Og so at siga allir partar hava víst á, at trivnaður og góðir felagsskapir eru lyklaorð í hesum sambandi. Børn og ung, sum trívast og eru partur av einum felagsskapi, eru í minni vanda fyri at misnýta rúsevni. Tí skulu trivnaður og felagsskapir raðfestast.

Heildarætlanin fer eisini at leggja dent á hjálp til menniskju, sum longu hava rúsevnistrupulleikar, Neyðugt er við avrúsingar- og viðgerðartilboðum, har fólk sleppa burtur úr dagliga umhvørvinum, og stundum verður eisini neyðugt at hjálpa teimum at skapa eitt nýtt rúsfrítt netverk, fáa nýggjar vinir og møguliga hjálp til útbúgving, arbeiði og bústað.

Týdningarmikið er tí at betra og víðka verandi skipanir og at fáa skipanirnar at arbeiða betur saman. Soleiðis fáa vit betri heildarloysnir, sum eru skilabestar fyri føroyska samfelagið.

Arbeiðsbólkurin fer eisini at mæla til, at fleiri kanningar og hagtøl verða fingin til vega. Tí uttan hagtøl er trupult at vita, hvar møgulig hjálp eigur at setast inn, og hvørji átøk muna best.

Frágreiðing við tilmælum verður handað løgmanni í heyst.

## FÍGGJAR-, BÚSKAPAR- OG SAMFERÐSLUMÁL

**Fíggjarmál**
Føroyska samfelagið hevur stórar búskaparligar avbjóðingar, tá ið hugsað verður um afturvendandi sveiggini í búskapinum frá okkara tilfeingisvinnum, og tá ið um ræður haldførið í almenna búskapinum. Avbjóðingarnar gjørdust uppaftur størri, nú koronufarsóttin rakti allan heimin og eisini Føroyar. Tí má verða stýrt við varsemi og nærlagni, so Føroyar koma væl ígjøgnum hesar avbjóðingar, uttan at vælferðin verður sett í vanda.
Í farnu tingsetu hevur landsstýrið millum annað avgreitt hesi mál:

**Fólkapensjónistar meira at liva av**
Landsstýrið setti sær fyri fyrst í stjórnarskeiðnum, at allir fólkapensjónistar skuldu fáa munandi meira at liva av. Eitt av átøkunum var at lata fólkapensjónistum tilsamans 6.000 kr. í serligum skattafrádrátti. Í 2020 fingu fólkapensjónistar 3.000 kr. í serligum skattafrádrátti, og í 2021 fáa teir aðrar 3.000 kr. Saman við hækkan av grundarupphæddini og samhaldsfasta hava fólkapensjónistar fingið 1.250 kr. meir eftir um mánaðin frá 1. januar 2021.

**Eysturoyartunnilin liðugur og tikin í nýtslu**
Verkætlanin er størsta verkætlan í Føroya søgu, og hann er helst millum størstu framstigini, sum eru hend í føroysku samferðslusøguni. Eysturoyartunnilin knýtir Skálafjørðin og Havnina saman við einum undirsjóvartunli, ið tilsamans er um 11 kilometrar langur. Tunnilin styttir farleiðina millum Havnina og Runavík/Strendur úr 55 kilometrum niður í 17 kilometrar.

**Verkætlanin tunlar norður um Fjall farin í gongd**
Verandi tunlar úr Klaksvík til Árnafjarðar og víðari til Norðdepils vórðu tiknir í nýtslu í 1965 og 1967. Tunlarnir eru einbreytaðir og lúka ikki nútíðarinnar krøv um hædd, breidd og trygdarútgerð. Tí kunnu heilt stór akfør ikki koyra ígjøgnum tunlarnar. Tunlarnir eru sostatt ein fløskuhálsur fyri virksemið norðan fyri tunlarnar.

Løgtingið samtykti í januar 2021 at hækka játtanarkarmin til verkætlanina til 522 mió. kr., sum svarar til eina dagførda kostnaðarmeting, íroknað væntaðar príshækkingar, sum verða einar 35 mió. kr. Sostatt kann landsstýrismaðurin gera bindandi avtalur tvørtur um fíggjarár fyri alla verkætlanina og fara undir at gera nýggjar tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegagerð. Ein farleið, sum lýkur øll krøv um dygd, trygd og framkomu.

Landsverk og Articon undirskrivaðu í apríl 2021 sáttmála um verkætlanina tunlar norður um Fjall. Talan er um størsta sáttmála, sum Landsverk hevur undirskrivað í einum. Sáttmálin fyri henda partin av verkætlanini er góðar 374 mió. kr. Tá er millum annað el-arbeiði ikki við. Eftir ætlan verða nýggju tunlarnir norður um Fjall lidnir í 2024.

**Tunlarnir til Dals og Fámjins farnir í gongd**
Vegurin til Dals er smalur og liggur ein langan tein á eini hill, har steyrrætt er í havið í niðara borði og eisini høgt uppfyri í ovara borði. Trupulleikar eru av, at tað ríður undan vegnum, og at grót ríður oman á vegin úr erva. Undanfarna landsstýri gjørdi av, at tunnilstoymið hjá Landsverki skal gera ein tunnil úr Húsavík til Dals. Fyrsta skotið til Dalstunnilin varð latið av í november 2020.

Nýggi Dalstunnilin er 2.200 metrar langur og 8 metrar breiður, og aftur at tunlinum skulu gerast 150 metrar av vegi húsavíkarmegin og 100 metrar av vegi dalsmegin. Síðani skulu umleið 2.500 metrar av vegi afturat breiðkast.

Fyri at fáa eina hóskandi farleið millum Ørðavík og Fámjin verður nýggjur tunnil gjørdur frá vegnum oman fyri Ørðavík og til vegin oman fyri Fámjin.

Nýggi tunnilin verður umleið 1.200 metrar langur. Harafturat skulu gerast umleið 1.000 metrar av landsvegi oman fyri Ørðavík og umleið 6.00 metrar oman fyri Fámjin. Nýggja farleiðin verður samanlagt umleið 2.800 metrar.

Verkætlanin er nakað seinkað, tí talan er um serstaka jarðfrøði, har tunnilin skal borast. Millum annað hevur verið neyðugt at kannað lendið væl, áðrenn endaliga linjuføringin varð løgd. Farið er undir tilgongdina at undangóðkenna fyritøkur, sum hava áhuga fyri at bora Fámjinstunnilin. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út seinni í ár og at byrja arbeiðið seint í 2021. Verkætlanin er mett at verða liðug í 2023–2024.

**Nýggi Hvalbiartunnilin liðugur og tikin í nýtslu**
Landsverk yvirtók í mai vegna landsstýrið nýggja Hvalbiartunnilin frá Articon. Tunnilin varð yvirtikin innan fyri ásettu tíðarfreistina og játtanina. Nýggi tunnilin er frá Gjánhamri í Trongisvági til Niðastabotn í Hvalba, og landsvegir eru gjørdir frá tunnilsmunnanum trongisvágsmegin til verandi landsveg í Trongisvági og frá tunnilsmunnanum hvalbiarmegin til Nesveg, tætt við brúnna um Kjógvavatn. Talan er um eina loysn, har lagt eisini er upp fyri einum komandi suðuroyartunli.

**TAKS fingið betur amboð til eftirlit við innsmugling av rúsevnum**
Í apríl í ár samtykti Løgtingið eina dagføring av tolllógini, sum millum annað tryggjar tollarum fult elektroniskt innlit í ferðafólkalistar og upplýsingar, sum flutningsfeløgini hava um tann ferðandi. Landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta neyvari reglur um, hvørjar upplýsingar skulu latast um ferðafólk, og hvussu upplýsingarnar skulu latast. Við broytingini fær TAKS eina greiðari og meiri einsháttaða mynd av teimum ferðandi, sum skal brúkast til at gera váðametingar av ferðafólki og manningum, sum koma um føroyskar havnir og um flogvøllin.

**Føroyingar fingið talgildan samleika**
Føroyar skrivaðu søgu, tá ið talgildi samleikin varð tikin í nýtslu í oktober 2020. Allir føroyingar fingu atgongd til Samleikan og Vangan í oktober 2020, sum eru týðandi partar av talgilda undirstøðukervinum í Føroyum.

Talan er loysnir í heimsflokki, og skipanirnar fara at gera tað munandi lættari og tryggari hjá fólki at avgreiða síni persónligu viðurskiftini á netinum. Talgildu Føroyar hava ment Samleikan og Vangan. Verkætlanin er eitt samstarv millum land, kommunur, privatar fyritøkur og almenn partafeløg. Talan er um eina slóðbrótandi verkætlan, sum ger tað skjótari, tryggari og lættari at samskifta enn áður.

**Strandfaraskip Landsins raðfest**
At Ternan fór í dokk á heysti 2020, vísti seg at blíva nógv meira umfatandi, drúgvari og dýrari enn væntað. Í 2020 vórðu nýttar 3,5 mió. kr., og í 2021 eru í fíggjarlógini játtaðar 4 mió. kr. til at umvæla

Ternuna. Tað eru veittar um 10,5 mió. kr. afturat í eykajáttan til Ternuna, so at kostnaðurin verður tilsamans um leið 18 mió. kr. Arbeiðið er liðugt, og Ternan er farin aftur í sigling. Meirkostnaðurin fyri at umvæla Rituna er 1,3 mió. kr. Í sambandi við at Eysturoyartunnilin læt upp, er neyðugt við betri rutuneti. Harafturat er ynskiligt at røkka bygdum í Vágum, sum higartil ikki hava havt fast rutusamband. Eykajáttan er veitt til hetta endamálið.

**Nýggj veiðigjaldslóg samtykt**

Í apríl í ár samtykti Løgtingið nýggja veiðigjaldslóg. Skipanin við uppboðssølum bleiv avtikin við løgtingslóg um sjófeingi, sum Løgtingið samtykti 21. desember 2019. Veiðigjaldslógin dagførir skipanina við veiðigjøldum, so at tey frameftir fylgja gongdini í vinnuni. Á hendan hátt kann fiskivinnan skapa virði til bæði land og vinnu undir tryggum kørmum.

**<u>Átøk komandi tingár:</u>**

**Korona og avbjóðingar**

Koronufarsóttin hevur givið føroyska búskapinum nýggjar avbjóðingar, sum koma aftrat afturvendandi avbjóðingunum við sveiggjum í fiskaprísum, nøgdum og oljuprísum. Tí er umráðandi, at stýrt verður við skili í hesum tíðum, og at gera neyðugu tillagingarnar í almenna geiranum fyri framhaldandi at tryggja øllum føroyingum vælferð. Serliga uppgávan komandi ár verður sostatt at fáa Føroyar trygt ígjøgnum koronuavbjóðingarnar.

**Hallið í landskassanum burtur í 2023**

Landsstýrið miðar eftir at minka hallið hjá landinum, sum er komið av heimsumfatandi koronufarsóttini, ið hevur havt við sær búskaparkreppu um allan heimin. Landsstýrið ætlar at betra úrslitið hjá landskassanum stigvíst næstu árini við 30 mió. kr. um árið, so at hallið minkar í 2022, og avlop verður í 2023. Aðalmálið er, at landskassin komandi árini skal hava vaksandi avlop, sum bæði kann brúkast til at minka landskassaskuldina og til at hava at standa ímóti við, tá ið búskaparliga verri tíðir koma.

Føroyar eru millum londini í heiminum, sum eru komin frægast gjøgnum kreppuna, og búskapurin hevur higartil verið minni skaladur av koronufarsóttini, um vit samanbera okkum við onnur lond. Landskassin hevði hall í 2020, og væntandi verður hall eisini í 2021 og 2022. Landskassin er tó søguliga væl fyri við einari nettoskuld, sum er minni enn 1 mia. kr.

**Útveita almennar tænastur**

Har tað er møguligt og skynsamt, skal privata vinnan kunna bjóða upp á almennar tænastur. Treytin er sjálvandi, at hetta fíggjarliga og tænastuliga er betri fyri brúkaran. Í komandi tingsetu er ætlanin at orða ein útveitingarpolitikk.

**Talgilding**
Landsstýrið hevur sett sær sum mál, at kunningar- og samskiftisvinnan skal stimbrast. Tað skal gerast við, at landið keypir føroyskar loysnir, har tað er møguligt. Ein týðandi partur at stimbra føroyska kt-vinnu er Talgildu Føroyar. Talgildu Føroyar hava íverksett Samleikan og Vangan, sum eru seinastu partarnir og høvuðstættirnir av verkætlanini. Í Vakstrarforumi er KST (kunningar- og samskiftistøkni) eitt vakstrarøki, sum arbeitt verður við.

Skjótt fara føroysku peningastovnarnir eisini at bjóða kundum sínum at brúka Samleikan til at fáa atgongd til netbankan og at skriva undir skjøl og flytingar talgilt. Íløgan, sum er gjørd í Talgildu Føroyar, skal gagnnýtast, og tað merkir, at fleiri almennar tænastur mugu gerast meira talgildar og nútíðarhóskandi. Arbeitt verður í løtuni við at menna eina virkisskrá, og hon verður væntandi liðug í 2022/23.

**Landsverk**
Landsverk hevur latið úr hondum tilmæli um, hvussu stovnurin skal skipast og virka í framtíðini. Í komandi tingsetu verður arbeitt við hesum tilmælum. Landsverk hevur smalkað bygnaðin og flutt játtan frá umsiting til kjarnuvirksemi. Landsverk er ein týðandi stovnur, sum hevur virkað fyri føroyska samferðslukervinum í nógv ár. Men tíðin krevur eisini tillagingar, sum skikka stovnin til best møguliga at fyrireika og stýra almennum verkætlanum, bæði tá ið ræður um tøkniliga og fíggjarliga partin.

**Strandfaraskip Landsins**
Strandfaraskip landsins eru ein av stóru og mest týðandi stovnum landsins fyri borgarar, tað almenna og vinnuna. Landsstýrið ætlar tí at fáa lýst og mett um virksemið hjá Strandferðsluni og at fáa uppskot til broytingar og betringar. Landsstýrismaðurin hevur sett arbeiðsbólk við neyðugari vitan og serfrøði at lýsa ymiskar spurningar í sambandi við Strandferðsluna. Arbeiðið snýr seg um søguligt baksýni, stýrisslag og at taka støðu til, hvørjar tænastur Strandferðslan skal veita. Arbeiðið hjá bólkinum verður liðugt seinni í ár. Síðan fara tilmælini frá bólkinum til politiska viðgerð.

**Suðuroyartunnilin verður fyrireikaður**
Landsstýrið arbeiðir við at fyrireika ætlanina um at gera ein suðuroyartunnil. Landsstýrið hevur sett 100 mió. kr. av til tunnilin frá 2025 og frameftir á langtíðarløguætlanini. Fyribils er mett, at tað fer at taka 7–9 ár at byggja ein møguligan suðuroyartunnil. Tá eru fyrireikingar, undankanningar og prosjektering ikki við.

Gongur alt væl í sambandi við forkanningarnar og fyrireikingarnar í sambandi við tunnilin, og taka óvæntað viðurskifti seg ikki upp, verður miðað eftir, at arbeiðið er komið rættiliga langt í 2021, og at síðstu forkanningarnar og fyrireikingarnar verða gjørdar í 2022.

**Eigarapolitikkur**
Landsstýrið fer at endurskoða og skipa sín leiklut í partafeløgum og grunnum. Tey flestu av partafeløgum landsins eru løgd undir Fíggjarmálaráðið. Harumframt eru nakrar fyritøkur í grunnum. Eitt endamál er, at skilnaður skal vera millum uppgávurnar, ið landið hevur sum ávikavist eigari og sum fyrisitari av lóggávu og eftirliti. Eisini arbeiðir landsstýrið við at gera reglur og ætlanir fyri, hvønn leiklut landið skal hava sum eigari. Landsstýrið vil tryggja, at partafeløgini hjá landinum verða umsitin á bestan hátt, men fer eisini at taka støðu til, um tað er skilabest at einskilja fyritøkur. Ætlanin er at gera eina kanning um, hvørjar avleiðingar tað hevur at skilja netið frá Føroya Tele. Hesum arbeiði stendur nevndin í Føroya Tele fyri. Eftir ætlan skal tað vera liðugt seinni í ár ella tíðliga næsta ár. Landsstýrið ætlar at selja sín ognarlut í P/F Tjaldri og umhugsar ognarskapin í øðrum feløgum.

**Almenna roknskaparverkið**
Landsstýrið fekk í 2020 eina yvirskipaða greining av almenna føroyska roknskaparverkinum frá OECD. Greiningin snúði seg um, í hvønn mun okkara almenna roknskaparverk lýkur "best practice" og altjóða roknskaparkrøv á økinum. OECD hevur 6 tilmæli um at styrkja føroyska roknskaparverkið, so vit eru á hædd við tey bestu á økinum. Tað hendir nógv á økinum í hesum tíðum. Gera vit einki í Føroyum næstu árini, fara vit at liggja í niðasta endanum, tá ið talan verður um at lúka altjóða roknskaparkrøv fyri almennar roknskapir. Komandi tvey árini verða stig tikin til at seta tilmælini í verk. Tilmælini snúgva seg serliga um ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap, bæði við atliti at, at alt alment virksemi verður tikið við í roknskapin, og at allar almennar ognir verða skrásettar við "røttum" virði.

## FISKIVINNU- OG TILBÚGVINGARMÁL

### Fiskivinnumál

**Fiskiloyvi**
Í samgonguskjalinum frá september 2019 er millum annað ásett, at fiskiloyvi skulu knýtast at stálinum fyri at tryggja manningunum rætta hýru. Umsetiligheit verður loyvd, og í umseting kunnu kvotur/fiskidagar latast fyri eitt ár í senn ella sum endalig avhending.

Harnæst er ásett í samgonguskjalinum, at besta gagnnýtsla fæst úr tilfeinginum, um loyvini verða útskrivað sum eginkvotur. Tí fer landsstýrið at miða ímóti at skipa allan fiskiskap sum eginkvotur.

Í samgonguskjalinum er eisini ásett, at fiskidagaskipanin verður varðveitt, og gerast skal ein umsitingarætlan.

Fyrsta stigið í ætlanini hjá landsstýrinum varð avgreitt við ársenda 2019, tá ið sjófeingislógin varð samtykt. Í 2020 og 2021 eru onnur stig tikin – umframt sjófeingislógin – við tí endamáli at fremja ætlan landsstýrisins.

**Eginkvotur**
Í 2021 er skipanin av fiskiskapinum eftir botnfiski á Flemish Cap og við Grønland broytt til eina skipan við eginkvotum. Partar av skipanini í uppsjóvarveiðu, ið áður vóru skipaðir við felagskvotum, eru nú broyttir til skipan við eginkvotum. Flestu menningarkvotur frá 2018 og 2019 eru somuleiðis lagdar um til vanligar eginkvotur.

Í breiðum samandrátti kann staðfestast, at við ársenda 2021 er stórur partur av fiskirættindunum skipaður við eginkvotum ella egnum fiskidøgum, sum kunnu avhendast millum øll føroysk fiskifør við veiðiloyvi, tó við avmarkingum fyri fiskidagar.

**Loyvi verða knýtt at skipinum**
Sjófeingislógin, sum kom í gildi við ársbyrjan 2020, ásetir, at frá 1. januar 2022 skulu rættindini vera knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi. Tað merkir, at við ársenda í ár er málið hjá landsstýrinum at knýta rættindini at stálinum rokkið og sett í verk.

**Fiskidagaskipan og umsitingarætlan**
Fiskidagaskipanin er varðveitt, men regluverkið er broytt á summum økjum. Reglurnar um, hvar og hvussu fiskidagar kunnu brúkast, eru herdar. Fiskidagar í hvørjum bólki kunnu nú bert brúkast við fiskiførum, ið eru innan fyri stødd og framtøkumegi, og við tí veiðihátti, sum er tilskilaður fyri bólkin. Tað stuðlar m.a. undir, at fiskidagaskipanin ikki verður skeiklað, eitt nú við at fiskidagar, ið eru ætlaðir til fiskiskap á ytru leiðunum, ikki kunnu flytast til fiskiskap á innaru leiðunum.

Í 2021 er fiskidagatalið ásett og lýst í kunngerð. Tað er gjørt samsvarandi eini umsitingarætlan, sum sigur, hvussu árliga dagatalið skal ásetast. Endamálið er bæði at stuðla undir bestu gagnnýtslu av tilfeinginum og at tryggja, at tey, sum virka í fiskidagaskipanini, hava støðugar karmar og rímiliga tíð frameftir vita, hvussu veiðimøguleikarnir verða.

Málið við grundarlagi í umsitingarætlanini er at stýra fiskiskapinum soleiðis, at vit eru innan fyri ásett mørk. Veiðireglan leggur upp til, at ikki skal vera neyðugt at hækka ella lækka dagatalið á hvørjum ári. Tað skal bert verða gjørt, um fortreytirnar hjá fiskastovnunum ella lutfallið millum veiðu og fiskastovn broytist munandi.

Mett verður, at umsitingarætlanin hevur týdning, tá ið vit selja føroyskan fisk og fiskavørur. Nýtsla av umsitingarætlanum, ið hava tað mál at gagnnýta fiskastovnar burðardygt – lívfrøðiliga og búskaparliga – stuðla undir søluarbeiðið at selja fiskavørur til góðar marknaðir og møguligar góðkenningar í hesum sambandi.

**Gransking og menning**
Landsstýrið ásannar, at gransking og menning í veiðu og matvøruframleiðslu eru avgerandi fyri kappingarførið hjá føroysku fiskivinnuni og fyri at skapa mest møguligan virðisvøkstur.

Við atliti at hesi ásannan verða støðugt stig tikin við tí endamáli at troyta nýggjar møguleikar. Royndarloyvi eru latin í sambandi við gagnnýtslu av reyðæti, royndir kunnu gerast eftir lodnu í føroyskum sjóøki, og ætlandi skal royndin eftir tunfiski í føroyskum øki takast uppaftur.

Á økjunum gransking og menning fevnir verandi fiskivinnuskipan eisini um kvotur og royndarloyvi innan fyri skipanirnar vinnuligar royndir og verkætlanir, vinnuligar fiskiroyndir og fiskivinnuroyndir. Tann seinasta skipanin fevnir beinleiðis um fíggjarligan stuðul.

Málið hjá landsstýrinum er at gagnnýta hesar skipanir á besta hátt við gransking, virðisvøkstri og menning fyri eyga.

Nýggja havrannsóknarskipið "Jákup Sverri" er í 2021 farið í sigling, og nýtslan av hesum skipi skal stuðla undir munadygga føroyska gransking av viðurskiftum í sjónum. Havstovan fer tá at kunna veita almenningi og myndugleikum betur dagførdar upplýsingar um havumhvørvið og livandi tilfeingið í havinum, samanborið við møguleikarnar hjá gamla og ikki tíðarhóskandi skipinum "Magnus Heinason". Somuleiðis skal "Jákup Sverri" gera sítt til, at Havstovan kann fáa meira samstarv í føroyskum og altjóða granskingarumhvørvi við tí fyri eyga at víðka granskingarvirksemið, at knýta granskarar at stovninum eins og at fáa uttanhýsis fíggjarorku til stovnin og rakstur av skipi.

**Krav um skiljirist og ávísar leiðir latnar upp**

Á vári 2021 vórðu stig tikin til at seta í verk krav um skiljirist í trolfiskiskapi í føroyskum sjógvi, og at ávísar leiðir kunnu latast upp fyri fiskiskapi við troli. Broytingarnar eru grundaðar á royndir, ið áður eru gjørdar við rist í upsatroli, sum vístu, at rist skilir væl ungfisk frá, uttan at veiðan eftir tí størra fiskinum minkar. Hetta er eisini orsøk til at lata leiðir upp, sum eru stongdar fyri trolfiskiskapi, tí serliga smáur upsi verður veiddur har.

Ætlanin byggir á ta fortreyt, at allur ungfiskur verður vardur á fullgóðan hátt eins og gýtingarøkið, og at meir verður fiskað av stórum fiski.

**Fiskiveiðieftirlitið**

Í fiskiveiðieftirliti verður arbeitt við at menna skrásetingarskipan av veiðiloyvum og atknýttum rættindum. Arbeiðið byggir á endamálið um, at øll fiskirættindi skulu vera knýtt at ávísum skipi í seinasta lagi í 2022. Málið er, at myndugleikin tryggjar góða og einfalda kunning um, hvussu veiðirættindi eru skipað, tað veri seg millum vinnu- og skipabólkar, feløg ella øki.

Landsstýrið ásannar, at vaktar- og bjargingarskipið "Tjaldrið" er vorðið gamalt. Tí verður í komandi tíðum sjøtul settur á arbeiðið at fyrireika at keypa nýggjari skip.

**Fiskiveiðisamráðingar**

Á heysti 2020 varð karmssáttmáli millum Føroyar og Bretland undirritaður. Sáttmálin fevnir um tær meginreglur, sum fiskivinnusamstarvið millum londini bæði skal virka eftir í framtíðini.

Týdningarmestu ásetingarnar fevna um atgongd, kvotuflytingar og eftirlitssamstarv. Harumframt er ásett, at londini bæði raðfesta vísindaliga grundaða umsiting av fiskastovnum, og sjøtul verður settur á samstarv um havlívfrøði og havumhvørvi.

Umframt at gera karmsáttmála hava samráðingar verið um ítøkiliga árliga semju um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Bretland. Samráðingarnar hava verið í einum tíðarskeiði, sum byrjaði í 2020 og helt fram inn í 2021. Kortini komu partarnir ikki á mál um eina avtalu fyri 2021. Partarnir eru samdir um at halda fram í samráðingunum, so at avtala fæst fyri 2022.

Samráðingarnar millum Føroyar og ES fyri 2021 gjørdust øðrvísi, nú Bretland ikki er partur av ES. Samráðingarnar drógu út, tí torført gjørdist at finna eina semju, ið báðir partar kundu góðtaka. Tí er støðan tann í hesum samráðingunum, at eingin semja er undirritað enn, og útlit eru fyri, at næsta stigið verður – eins og fyri Bretland – at fyrireika arbeiðið til eina fiskiveiðiavtalu fyri 2022.

Samráðingarnar við ES og við Bretland bóru sostatt ikki á mál, men fiskiveiðiavtalur vórðu gjørdar við hini londini – Russland, Noreg, Ísland og Grønland – eftir somu skipan sum undanfarin ár. Hesar avtalur tryggjaðu teimum pørtunum av føroyska fiskiflotanum, sum vanliga roynir á hesum leiðum, framhaldandi fjølbroytni í 2021, hvat fiskimøguleikum viðvíkir.

Seinastu árini hava verið avbjóðingar at fáa semju millum strandarlondini, sum varða av stóru uppsjóvarfiskastovnunum sum svartkjafti, norðhavssild og makreli. Sammett við undanfarin ár er munurin í 2021, at í ár var ikki grundarlag fyri at gera semju millum tey trý strandarlondini – Føroyar, ES og Noreg – um makrel, tí Bretland nú er farið úr ES. Henda broyting var høvuðsorsøkin til, at eingin semja varð gjørd um makrel – heldur ikki millum tey trý og Bretland.

Føroyar og Noreg hava gjørt semju um atgongd at fiska part av makrelkvotuni í sjóøkinum hjá hvør øðrum, og at hendan veiðan kann landast inni hjá hvør øðrum.

## <u>Tilbúgvingarmál</u>

**Korona**
Koronufarsóttin hevur sett síni serstøku krøv til virkisøkið samskipan av tilbúgvingini. Bygnaðarliga er undir landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum skipað. Kreppuráðið er fyrisitingarliga staðið fyri yvirskipaðu tvørfakligu kreppustýringini.

Kreppuráðið skal tryggja gott samskifti millum land og kommunur eins og millum føroyskar og danskar myndugleikar. Endamálið við at kalla Kreppuráðið saman er at tryggja, at umboðini í ráðnum hava eitt stað, har økisábyrgdarpartarnir møtast og taka sær av yvirskipaðum spurningum í sambandi við tvørfakligu samskipanina í størri hendingum.

Í Kreppuráðnum hava luttikið leiðandi umboð fyri øll stjórnarráðini undir Føroya landsstýri umframt umboð fyri kommunurnar og donsku myndugleikarnar: løgregluna, ríkisumboðið, Arktisk Kommando og landslæknan.

Kreppuráðið var virkið í serstakan mun í fyrstani, eftir at farsóttin kom til Føroyar. Fleiri partar, ið høvdu uppgávur í sambandi við farsóttina, høvdu javnan tørv á at samskifta hvør við annan. Harnæst høvdu ymsu partarnir í tilbúgvingini tørv á at hava felags fatan av ymsum støðum ella átøkum. Júst at tryggja felags fatan millum ymsar partar í tilbúgvingini yvirskipað er ein sjálvsagdur leiklutur hjá Kreppuráðnum.

Ein uppgáva hjá Kreppuráðnum – umframt yvirskipað samskipan – er eisini at kunna um yvirskipað og tvørfaklig viðurskifti í tilbúgvingarátøkum.

Samskipan í Kreppuráðnum er nú roynd í fleiri umførum, og sigast kann, at Kreppuráðið er fyrireikað at umsita samskipandi uppgávur í tilbúgving, ið natúrliga hoyra ráðnum til.

**Kommunur og tilbúgvingarætlanir**
Á økinum samskipandi tilbúgving er støðugt arbeiði lagt í tað virksemið, ið hevur til endamáls at fáa kommunurnar at menna og gera tilbúgvingarætlan á sínum øki. Arbeiðið er stórt og víðfevnt og lutfalsliga nýtt fyri fleiri kommunur. Tær einstøku ætlanirnar eru nógvar í tali – umleið 19 – og slíkt arbeiði tekur tíð. Málið er tó, at alt arbeiðið at gera tilbúgvingarætlanir fyri kommunur er liðugt í 2022.

**Bjargingarfeløg**
Føroysku bjargingarfeløgini eru týðandi partur av tilbúgvingini, og tí raðfestir landsstýrið samstarvið millum bjargingarfeløgini og almenna myndugleikan høgt. Árligi stuðulin á Løgtingsins fíggjarlóg er umráðandi á hesum økinum, serliga í sambandi við at menna og fáa til vega nýggjar bjargingarbátar. Í 2021 kemur enn ein nýggjur og tíðarhóskandi bátur til Føroya, og aðrir fáa høvuðsumvælingar og nýgerð.

**Føroyska veðurtænastan**
Í 2020 setti landsstýrið sær fyri at seta á stovn føroyska veðurtænastu. Málsøkið er yvirtikið fyri fleiri árum síðani, men stovnsetanin av føroysku veðurtænastuni kom í drag.

Í 2021 er gongd sett á arbeiðið at menna føroysku veðurtænastuna. Í vár vórðu tveir veðurfrøðingar settir í starv, og seinni í ár verður talið víðkað til fólk, ið umsita leiðslu, samskipan og umsiting. Í fyrstani er tænastan skipað undir Vørn.

Landsstýrið metir, at nógv fyrilit eru at hava í sambandi við menning av nýggju tænastuni. Eitt teirra er at gera neyvar og nýggjar forsagnir í sambandi við flogferðslu. Onnur fyrilit verða sjálvsagt eisini, nú tænastan skal mennast í síni heild.

Við grundarlagi í hesum viðurskiftum er avgerð tikin um at staðseta Veðurstovu Føroya á flogvøllinum í Vágum. Tað skal í hesum sambandi leggjast áherðsla á, at ætlanin ikki er, at flogvøllurin verður einasta staðið, ið nýtt verður til veðurtænastu. Í hesum sambandi skal nevnast, at vaktararbeiðspláss og líknandi kunnu vera á øðrum plássum kring landið.

Endamálið, ið arbeitt verður fram ímóti, er at menna eina dagførda, útbygda og nøktandi føroyska veðurtænastu. Tænastan skal tryggja betri og meira álítandi veðurforsagnir fyri allar Føroyar og føroysk áhugaøki. Góð miðlan verður sera týðandi partur av tænastuni. Tænastan skal, sum frá líður, eisini gerast týðandi partur av kanning og gransking í veðri og veðurlagsbroytingum.

Føroyska veðurtænastan verður ætlandi ment í tveimum stigum; fyrsta stigið verður framt í 2021 og 2022. Í 2023 er ætlanin at fáa hægri játtan í sambandi við at menna tænastuna til fult útbygda skipan, ið kann gerast virkin alt samdøgrið. Tørvur kann gerast á fígging til ymsar íløgur, m.a. í fleiri veðurradarar og aðra útgerð.

## HEILSUMÁL

### Heilsupolitikkur

Høga raðfestingin á heilsuøkinum heldur fram og er við til at fremja stórætlaða heilsupolitikkin hjá landsstýrinum. Tað merkir, at upprunaliga heilsupolitiska kósin eisini verður hildin, hóast nógv orka er og verður brúkt til áleikandi koronufarsóttina og at skipa tilboðið um koppseting til allar føroyingar, sum hava fylt 16 ár.

Arbeiðið at menna sjúkrahúsverkið samsvarandi menningarætlanini heldur fram, og arbeitt hevur verið við eini røð av heilsupolitiskum raðfestingum. Fleiri av hesum raðfestingum hava longu borið frukt. Millum stóru avrikini kunnu nevnast viðgerðartrygdin, atlimaskapurin í Heimsheilsustovninum WHO og diabetesmiðstøðin, sum næsta ár verður sett á stovn í Føroyum í samstarvi við Novo Nordisk Grunnin.

Viðgerðartrygdin er ein hornasteinur í heilsupolitikkinum hjá landsstýrinum, og hon skal tryggja, at eingin føroyingur skal bíða longur enn 30 dagar eftir at sleppa í viðgerð. Samanumtikið gongur alt rætta vegin í so máta, og á fleiri útgreiningar- og viðgerðarøkjum er málið longu rokkið.

Eisini í psykiatriini eru týðandi mál rokkin, eitt nú er tilboðið um ókeypis sálarfrøðihjálp til ung, ið líða av angist ella tunglyndi, farið at virka.

Eitt yvirskipað mál í menningini av okkara heilsuverki er mest møguligt skynsemi og samanhangur í virkseminum á øllum økjum. At tryggja hetta eru lunnar lagdir undir at skipa eitt nýtt Fólkaheilsustýri. Fólkaheilsustýrið skal millum annað veita heilsufakliga ráðgeving og standa fyri fólkaheilsuátøkum, heilsutilbúgving og almennari kunning, og eftir ætlan verður stýrið sett á stovn á nýggjárinum.

Møguliga fer korona eisini at fylla nógv í tingsetuni, sum nú er byrjað, men tað fer ikki at forða fyri framhaldandi menning á øllum mótum á heilsupolitiska økinum, at gjørdar raðfestingar bera á mál, og at nýggjar raðfestingar verða gjørdar.

**Atlimaskapur í WHO (World Health Organization)**
Í mai í ár varð samtykt, at Føroyar fingu atlimaskap í Heimsheilsustovninum, WHO. Samstarv og luttøka í WHO gevur Føroyum atgongd til virðismikla vitan, kunning, samstarv og gransking á heilsuøkinum, sum Føroyar ikki hava atgongd til í dag. Føroyskur atlimaskapur í egnum navni í WHO fer at gera tað læ̈ttari at fáa beinleiðis kunning um áleikandi mál og farsóttir, sum til dømis COVID-19, og fer at stimbra ein virknari leiklut og sjónligari støðu hjá Føroyum um vitan og gransking á heilsuøkinum og kreppustýring. Føroyskur atlimaskapur gevur eisini beinleiðis møguleika at vísa á føroysk úrslit og gransking viðvíkjandi heilsumálum. Atlimaskapurin fer eisini at seta krøv til førleika í Føroyum at kanna og lýsa egin viðurskifti í sambandi við gransking og stýring viðvíkjandi heilsumál og verður tískil eisini við til at styrkja og menna umsiting, gransking og samskipan á økinum í Føroyum.

**Diabetismiðstøð í Føroyum**
Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Grunnurin eru farin undir eitt skipað samstarv, sum skal veita persónum við diabetes og øðrum endokrinologiskum sjúkum enn betri viðgerðartilboð, enn teir longu fáa í føroyska heilsuverkinum. Endamálið við samstarvinum er at fyribyrgja diabetes og eftirsjúkum, sum standast av diabetes, umframt at betra lívsgóðskuna og økja lívslongdina hjá persónum við diabetes og øðrum endokrinologiskum sjúkum. Í samstarvinum millum Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Grunnin verður dentur lagdur á at styrkja viðgerðartilboð, tað tvørgeiraliga samstarvið og gransking. Harafturat verður ein diabetesmiðstøð skipað og stovnsett í Sjúkrahúsverkinum 1. januar 2023.

**Endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at betra møguleikarnar hjá teimum, ið av sjúku ella skaða hava mist førleika, at endurvinna mistu førleikarnar. Sum ein avleiðing av hesum eru tískil fleiri nýggj tilboð um endurvenjing sett á stovn á teimum trimum sjúkrahúsunum. Játtanir til at menna endurvenjingartænastur í sjúkrahúsverkinum eru øktar í hesum samgonguskeiðnum. Ætlanin er at fáa meirjáttan á hvørjum ári komandi árini til endurvenjing. Serligt tilboð um neurorehabilitering er á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og tað verður gjørt í tøttum samstarvi við Vejlefjord Rehabilitering, Hvidovre hospital og onnur. Endamálið við samstarvinum er at tryggja eitt mennandi og dygdargott tilboð til sjúklingabólkin. Í 2020 byrjaði eitt endurvenjingartilboð til parkinsonsjúkingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og tað virkar eftir ætlan. Síðan á heysti í fjør hava allir krabbameinssjúklingar, ið fáa kemoviðgerð á Landssjúkrahúsinum, fingið bjóðað endurvenjing. Talan er um eitt nýtt tilboð sum ikki hevur verið áður.

**Fólkaheilsustýri**
Seinnu árini er tað vorðið støðugt meira eyðsýnt, at tørvur er á, at tær yvirskipaðu heilsufakligu uppgávurnar í Føroyum verða savnaðar á einum staði – í einum fólkaheilsustýri. Tørvurin á einum fólkaheilsustýri gjørdist tó sera sjónligur, tá ið koronakreppan stakk seg upp. Av tí at einki slíkt stýri

fanst, var eitt heilsufakligt ráðgevaratoymi skipað í Heilsumálaráðnum, sum var í tøttum samstarvi við landslæknan. Royndir frá ráðgevaratoyminum hava verið ein undanfari fyri komandi Fólkaheilsustýrinum. Fólkaheilsustýrið skal røkja eina røð av uppgávum í sambandi við heilsufakliga ráðgeving og fólkaheilsutiltøk, gera lýsingar og greiningar, kunning til almenningin og heilsutilbúgving o.s.fr. Talan verður ikki um at gera nýggjan stovn, men at leggja uppgávur frá ymsum ráðum, deildum og stovnum saman í eitt fólkaheilsustýri. Við at skipa fleiri av smáu eindunum á heilsuøkinum í eitt stýri ber til at nýta verandi orku á økinum munandi meira skynsamt, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan. Fólkaheilsustýrið fer ikki at fevna um Landslæknaembætið. Arbeiðið at gera eina ætlan at skipa Fólkaheilsustýrið er farið í gongd, og Fólkaheilsustýrið verður sett á stovn 1. januar 2022.

**Skipan við viðgerðartrygd innan fyri 30 dagar**
Landsstýrið hevur sett sær fyri, at skjót útgreining og viðgerð skulu vera hornasteinar í almenna heilsupolitikkinum. Tí er málið, at ein skipan við viðgerðartrygd skal setast í verk, sum ásetur, at eingin skal bíða í meira enn 30 dagar eftir at koma í viðgerð. Í Sjúkrahúsverkinum eru raðfestingar gjørdar, sum hava til endamáls at stytta bíðitíðirnar. Nevnast kunnu fleiri ambulantar viðgerðir og styttri innleggingartíð; skjótari útgreinan fyri demens; diagnostiski depilin á Landssjúkrahúsinum er raðfestur; virksemið við MR-skannara er víðkað; størri játtan til eitt nú ADHD-viðgerðarstovu; svøvnkøvuvirksemi á Klaksvíkar sjúkrahúsi og víðkaðir møguleikar at gera røntgenkanningar á Suðuroyar sjúkrahúsi. Harafturat eru aðrar skipanir settar í verk, sum skulu stytta bíðilistar. Nevnast kann, at ein skipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til fólk í aldrinum 15 og 35 ár við angist ella løttum til moderat tunglyndi er sett í verk.

**Krabbameinsætlanin endurskoðast**
Á heysti í fjør varð ein arbeiðsbólkur settur at orða nýggja krabbameinsætlan. Nýggja krabbameinsætlanin er í samsvari við málini í samgonguskjalinum. Somuleiðis er hon í samsvari við málið hjá landsstýrinum um viðgerðartrygd, og tí fer tað eisini at standa í nýggju krabbameinsætlanini, at eingin krabbameinssjúklingur skal bíða longur enn 30 dagar eftir útgreining og viðgerð. Arbeiðið við nýggju krabbameinsætlanini er býtt í tveir partar. Í tí fyrra partinum verður galdandi krabbameinsætlan frá 2009 eftirmett. Undir hesum partinum verður hugt at, hvørji tilmæli enn liggja á láni, og hvussu tey kunnu setast í verk. Seinni parturin snýr seg um at lýsa støðuna í dag við atliti at krabbameinsfyribyrging og sjúklingagongdum hjá krabbameinssjúklingum. Arbeiðsbólkurin skal koma við tilmælum um átøk og fyriskipanir at fyribyrgja krabbameini og tryggja best møguligar sjúklingagongdir. Nýggja krabbameinsætlanin skal handast landsstýrismanninum í september í ár.

**Tiltøk at minka um bíðilistar**
Í mong ár hevur tað verið eitt ynski hjá bæði sjúklingum, heilsustarvsfólkum og politikarum, at bíðilistar til ymsu viðgerðartilboðini í Sjúkrahúsverkinum vóru tøkir. Tað var tí sera stórt framstig, tá ið bíðilistar fyri fyrstu ferð vórðu almannakunngjørdir á heysti 2020. Arbeitt verður við at menna hetta, m.a. við at ein hagtalseind verður styrkt í Sjúkrahúsverkinum. At bíðilistar yvir tær ymisku sergreinarnar verða lýstir regluliga er somuleiðis ein fyritreyt fyri at kunna hava eina almenna skipan

við viðgerðartrygd. Harumframt eru tiltøk sett í verk, sum skulu minka bíðilistarnar. Nevnast kunnu MR-skanningar á Landssjúkrahúsinum og CT-skannarin á Suðuroyar sjúkrahúsi. Eitt skipað tilboð er sett í verk, har MR-skannarin verður mannaður fýra eyka kvøld um vikuna fyri at nøkta tørvin á skanningum. Harumframt er tað raðfest at fáa tikið CT-skannaran á Suðuroyar sjúkrahúsið í nýtslu. Í hesum sambandi vórðu tveir radiografar settir í starv í apríl í fjør, og CT-skannarin varð tikin í nýtslu í mai í fjør. Sjey mánaðir eftir, at CT-skannarin varð tikin í nýtslu, vóru 479 skanningar gjørdar, sum annars høvdu verið gjørdar á Landssjúkrahúsinum.

**Koronustøðan**

Mált eftir tali á smittaðum, innløgdum og deyðum orsakað av koronu eru Føroyar komnar væl gjøgnum farsóttina higartil. Sjúkrahúsverkið er ongantíð komið í álvarsligar trupulleikar av koronu, tó at vanliga virksemið í tíðarbilum hevur verið meira og minni skert. Nógv orka hevur verið løgd í at kanna fólk fyri smittu. Tað hevur verið gjørt millum ferðandi, tá ið tey koma til Føroya, og mælt verður til at endurtaka kanningina nakrar dagar eftir komu. Harumframt hava øll í landinum havt møguleika at lata seg kanna ókeypis. Tilsamans eru gjørdar 360.000 kanningar og sløk 1.000 staðfest smittað. Kanningarnar eru gjørdar í samstarvi millum sjúkrahúsverkið og privatar veitarar. Tá ið smittustøður hava tikið seg upp, hava smittusporing og sóttarhald virkað sera væl, og tilburðirnir eru minkaðir burtur aftur skjótt. Ein føroyingur er deyður við koronu.

**Koronukoppseting**

Í Føroyum varð farið undir at koppseta fyri COVID-19 tann 30. desember 2020. Av tí at nøgdirnar av koppingarevnum, sum komu til landið fyrstu tíðina, vóru avmarkaðar, bar ikki til at fara undir at koppseta allar føroyingar í senn. Í fyrstu atløgu varð tí dentur lagdur á at verja heilsuverkið og síðani at fara undir at koppseta starvsfólk á eldra- og almannaøkinum, tí á henda hátt bar best til at tryggja hesar skipanir og samstundis veita sjúkum og gomlum bestu verju. So hvørt sum fleiri skamtar av koppingarevni eru komir til landið, er tilboðið um koppseting víðkað til støðugt fleiri bólkar. Tað hevur yvirhøvur gingið væl við koppsetingini í Føroyum. Koppsetingin hevur gingið skjótt, undirtøkan hevur verið góð og gagnnýtslan av koppingarevni verið sera stór. Meira enn helvtin av øllum føroyingum er nú liðugt koppsett fyri koronu.

**Samskipa og menna Sjúkrahúsverkið**

Sjúkrahúsverkið er nú skipað við einari yvirskipaðari leiðslu, sum er mannað við forstjóra og báðum sjúkrahússtjórunum. Yvirskipaða leiðslan hevur ábyrgd av at leggja viðgerðir og tænastur á teimum trimum sjúkrahúsunum til rættis á ein slíkan hátt, at alt tilfeingið í sjúkrahúsverkinum verður nýtt so skilagott sum gjørligt. Yvirskipaða leiðslan hevur myndugleika til innan fyri karmarnar í sjúkrahúslógini og teimum kørmum, sum politiska skipanin setir, at skipa funktiónirnar upp á tvørs av sjúkrahúsunum. Visjón, missión og virði eru orðað fyri Sjúkrahúsverkið, umframt at Sjúkrahúsverkið hevur fingið ein felags samleika og felags búmerki. Arbeitt verður við at menna eina nýggja felags heimasíðu fyri Sjúkrahúsverkið.

**Nýggjur meginbygningur á Landssjúkrahúsinum**
Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum, nevndur H-bygningurin, er ein av størstu og týdningarmestu útbyggingunum hjá landinum. H-bygningurin skal hýsa psykiatriska deplinum, medisinskari seingjadeild, føði- og barnsburðadeild, rehabiliteringseind og nýggjum køki umframt goymslu og parkeringskjallara. Stórur dentur verður lagdur á at byrgja fyri smittu, og tað er eisini ein grundleggjandi orsøk til, at H-bygningurin bert hevur einastovur. H-bygningurin verður eftir ætlan klárur at taka í nýtslu í 2021.

**Fleiri serlæknar í Sjúkrahúsverkinum og læknar undir útbúgving**
Seinnu árini eru sett serstøk tiltøk í verk, sum hava til endamáls at seta fleiri serlæknar í starv og útbúgva yngri læknar. Tiltøkini hava eydnast sera væl. Tað hevur eydnast Sjúkrahúsverkinum at seta fleiri nýggjar serlæknar í starv í fleiri sergreinum. Í summum førum hevur talan verið um at seta serlæknar í starv í sergreinum, sum ikki vóru í Sjúkrahúsverkinum áður. Í kjalarvørrinum á øktu serlæknamanningini hevur eisini verið tørvur á at seta onnur heilsustarvsfólk. Arbeiðið við hesi góðu gongdini fer at halda fram komandi árini. Í fíggjarlógini fyri 2021 eru játtaðar 3,2 mió. kr. til endamálið. Tað hevur alstóran týdning fyri heilsuverkið, at læknar støðugt verða útbúnir. Landsstýrið raðfestir at útbúgva yngri læknar. Játtanin er hækkað, so fleiri læknar kunnu koma í útbúgvingarstørv í heilsuverkinum í Føroyum.

**ADHD-klinikkin á Psykiatriska Depli**
Arbeitt hevur verið við at víðka um ADHD-klinikkina á Psykiatriska deplinum, og játtanin er økt í 2020 og 2021. Í fjør varð klinikkin mannað við sálarfrøðingi, sosialráðgeva, yngri lækna, sjúkrarøktarfrøðingi og skrivara. Harumframt verður økið í ár mannað við einum sjúkrarøktarfrøðingi og einum skrivara.

**Ókeypis sálarfrøðilig viðgerð**
Fleiri ung stríðast við ymsar sálarligar líðingar. At hjálpa hesum ungu er tí sett í verk ein royndarskipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til ung í aldrinum 15-35 ár, sum stríðast við angist ella lætt til moderat tunglyndi. Royndarskipanin byrjaði eftir páskir og heldur fram til 31. oktober 2023. Tilboðið fevnir um øll øki í landinum, og veittar verða í mesta lagi 12 ókeypis viðtalur hjá sálarfrøðingi. Í sambandi við royndarskipanina hevur Heilsutrygd sett ein verkætlanarleiðara, sum bæði hevur fakligu ábyrgdina av skipanini og ábyrgdina av at byggja upp, reka, góðskutryggja og eftirmeta hana.

**Dygdarkrøv til viðgerðarstovnar á rúsevnisøkinum**
Í fjør varð kunngerð sett í gildi, sum m.a. ásetur, at viðgerðarstovnar skulu søkja Heilsutrygd um góðkenning til at virka sum viðgerðarstovnur. Fyri at fáa góðkenning er treytin, at tilboðið eftir einari heildarmeting hevur neyðugu dygdina. Ymisk atlit verða tikin, tá ið Heilsutrygd skal meta um dygdina á einum viðgerðartilboði. Eitt nú skulu hølisviðurskiftini vera nøktandi, og somuleiðis skal starvsfólkabólkurin samanlagt hava viðkomandi útbúgvingar og royndir við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð. Mett verður, at slík krøv kunnu tryggja dygdina á viðgerðartilboðunum til gagns fyri tey, ið

eru bundin av rúsdrekka ella rúsevnum, og teirra avvarðandi. Heilsutrygd er farið undir arbeiðið at góðkenna stovnar, ið veita rúsviðgerð. Arbeiðið verður partvíst gjørt í samstarvi við Socialtilsynet fyri Fredriksberg kommunu. Góðkenningartilgongdin verður á heysti 2021.

**Endurskoða ílegulógina**

Nú meira enn 15 ár eru liðin, síðan løgtingslóg um gransking í mannaílegum (ílegulógin) varð sett í gildi, er gongd sett á arbeiðið at endurskoða lógina. Arbeitt varð við at gera broytingar í lógini í 2015, tá ið arbeiðsbólkur varð settur at skriva álit um "útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum". Í hesum áliti verður víst á fleiri ásetingar, ið eru neyðugar at broyta í ílegulógini. Harumframt er onnur lóggáva sett í gildi, sum krevur broytingar í ílegulógini. Í 2018 varð "Sundhedsloven" sett í gildi í Føroyum. Í donsku lógini eru t.d. ásetingar um "nationalt genomcenter". Hesar ásetingar vóru ikki settar í gildi í Føroyum, av tí at ynski var um at rætta ílegulógina til, so at ásetingarnar vórðu skrivaðar inn í ílegulógina. Nýggj løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum kom í gildi 1. januar 2021, og í hesum sambandi er neyðugt at gera broytingar í ílegulógini. Álitið um persónlagað medisin krevur eisini broytingar í ílegulógini, so at tilfarið á Ílegusavninum kann nýtast til persónlagaðan heilivág. Lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið í tingsetuni 2021/22.

**Neyðtøkumóttøka í Sjúkrahúsverkinum**

Arbeitt verður við at seta á stovn eina móttøku í Sjúkrahúsverkinum fyri persónar, sum hava verið fyri neyðtøku ella øðrum kynsligum harðskapi. Í móttøkuni fær persónurin neyðuga hjálp og viðgerð. Samstundis verða spor tryggjað, so tey eru tøk, um so er, at persónurin seinni vil melda tilburðin til løgregluna. Málið er at stovna móttøkuna í heyst.

**Dagføra danska heilsulóggávu í Føroyum**

Landsstýrið hevur sett sær fyri at dagføra so stóran part av donsku heilsulóggávuni sum gjørligt í hesum samgongutíðarskeiðnum. Hetta arbeiðið gongur væl. Fleiri lógir eru longu dagførdar, og arbeitt verður við at dagføra aðrar.

**Sambinda telduskipanir**

Talgilda Heilsuskipanin og skipanin hjá Apoteksverkinum eru uppstigaðar. Talgilda Heilsuskipanin er nú atkomulig hjá fyrstu ellisheimunum, so røtt handfaring, útlutan og skamtan av heilivági kann tryggjast.

## MENTA- OG UTTANRÍKISMÁL

### <u>Undirvísingarmál og gransking</u>

**Dagstovnaøkið**

Dagstovnalógin hevur meira enn 20 ár á baki. Kommunurnar hava ábyrgdina av rakstrinum av dagstovnunum, og landið hevur yvirskipaðu ábyrgdina. Landsstýrismaðurin eftirkannir í løtuni, hvussu uppgávan at menna dagstovnaøkið og útinna eftirlit best kann styrkjast.

**Fólkaskúlin**

Sjøtul er settur á arbeiðið at endurskoða fólkaskúlalógina. Fólkaskúlaráðið hevur gjørt uppskot um at dagføra m.a. tíma- og lærugreinabýtið og viðurskifti, ið eru tongd at hesum. Landsstýrismaðurin hevur avgjørt at seta arbeiðsbólk, sum skal gera uppskot til lógarbroytingar, sum fevna um kravdar lærugreinir, vallærugreinir og býtið millum hugvísindaligu og náttúruvísindaligu lærugreinirnar, og at geva handaligu og skapandi lærugreinunum størri rúmd í fólkaskúlanum.

Flokslæraraarbeiðið verður raðfest. Flokslærararin hevur stóran týdning fyri flokkin og tann einstaka nemingin. Hann vegleiðir flokkin bæði í fakligum og trivnaðarligum spurningum, er bindilið millum flokk og leiðslu, millum nemingar og foreldur og millum lærarar floksins og flokkin.

Áherðsla verður løgd á, at vit hava ein fólkaskúla, sum kann rúma øllum nemingum, har øll trívast og fáa sínar avbjóðingar. Trivnaður hevur høga raðfesting, og vit skulu forða fyri happing og leggja dent á fjølbroytni, bæði námsfrøðiliga og fakliga. Trivnaðarráðgevi er settur at veita skúlunum ráðgeving. Trivnaðarkanningar skulu gerast annaðhvørt ár, og avgjørt er, at antihappingardagur verður á hvørjum ári.

**Sernámsøkið**

Stórur tørvur er á tænastunum, sum Sernám veitir, og kannað verður, um tað ber til at skipa viðurskiftini øðrvísi. Økið má greinast nærri, bæði við atliti at tí stóra tørvi á sálarfrøðiliga hjálp til børn og ung og sernámsfrøðiligum átøkum sum heild.

Landsstýrismaðurin hevur sett ein arbeiðsbólk við umboðum frá heilsu-, almanna- og undirvísingarverkinum at orða uppskot til ætlan við átøkum, sum kunnu bøta um útlitini fyri, at ung við sálarligum og sosialum avbjóðingum megna at fullføra miðnám. Hildið verður fram at hyggja at viðurskiftunum í fólkaskúlanum fyri at finna loysnir í samstarvi millum geirarnar.

Hildið verður fram at menna sertilboð til nemingar kring landið, og Rásin verður útbygd. Síðan fyrsta serbreytin varð sett á stovn á miðnámi á Kambsdali í 2015, hevur verið arbeitt við at skipa serbreytir kring alt landið. Serbreyt er nú skipað í Suðuroy. Málið við serbreytini er at geva ungum við serligum avbjóðingum møguleika at nýta sínar gávur og førleikamenna seg út frá sínum egna støði og egnu fortreytum.

**Føroyskt sum annaðmál og heildarætlan**

Seinastu árini er tørvurin á undirvísing til nemingar, ið hava føroyskt sum annaðmál, øktur nógv. Bæði tí talið á tilflytarum er munandi økt, og tí tað eru nógvir tilflytarar, sum ikki duga ella skilja eitt norðurlendskt mál. Námsætlan fyri undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin er gjørd, og undirvíst verður eftir henni.

Eftirútbúgving av lærarum, sum skulu undirvísa í føroyskum sum annaðmál, er fyrireikað í samstarvi við Fróðskaparsetrið og byrjar í heyst. Ein heildarviðgerð um fremmandamál í allari skúlaskipanini er gjørd við tilmæli um, hvussu fremmandamálsundirvísingin verður styrkt.

**Miðnám og yrkisnám**
Eitt av málunum hjá landsstýrinum er at lyfta yrkisútbúgvingarnar og stovna nýggjar yrkisútbúgvingar. Fyrireikað verður at skipa eitt útbúgvingartilboð innan fyri aling og seta á stovn nýggja meistaraútbúgving fyri handverksmeistarar. Ferðavinnuútbúgving verður fyrireikað. Útbúgving, sum samantvinnar yrkisútbúgving og gymnasiala útbúgving, verður eisini fyrireikað.

Arbeiðið við at dagføra gymnasialu námsætlanirnar heldur fram, og miðað verður eftir at endurskoða fyrireikingarbreytina. Sum nakað nýtt er gymnasialt útbúgvingarráð sett, sum skal ráðgeva yvirskipað viðvíkjandi gymnasialu útbúgvingunum.

**Hægri útbúgvingar og gransking**
Fróðskaparsetur Føroya verður raðfest komandi árini. Arbeitt verður við at eftirmeta Fróðskaparsetur Føroya, har serligt atlit verður tikið til Námsvísindadeildina. Hetta er eitt afturvendandi arbeiði, sum skal gerast fyri at tryggja góðskuna á Setrinum. Arbeiðið at gera ein føroyskan førleikakarm (NQF) er komið væl áleiðis. Tað er ein fortreyt fyri at lúka krøvini í Bologna-avtaluni, sum tryggjar Fróðskaparsetrinum altjóða góðkenning. Arbeitt verður framhaldandi við kampusverkætlanini, sum er týdningarmikil fyri bæði trivnað og dygd á Fróðskaparsetrinum.

Kanning hjá Búskaparráðnum vísir stóran tørv á starvsfólkum áumsorganarøkjunum tey komandi 10 árini. Miðað verður tí eftir at taka fleiri næmingar inn á útbúgvingarnar til sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing á Setrinum umframt til heilsuhjálpara og heilsurøktara á Heilsuskúlanum. Í hesum sambandi verður eisini kannað, um heilsuhjálparaútbúgvingin kann verða ein lærlingaútbúgving.

Løgtingslóg frá juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan gevur møguleika fyri at seta felags karmar fyri hesi øki og gera tað lættari hjá øllum stuðulsumsøkjarum. Eitt ráð fyri gransking, menning og nýskapan verður skipað fyri at styrkja strategisku ráðgevingina til landsstýrið og vinnuna. Eisini skal ráðið kunna seta mál, eitt nú fyri luttøku í altjóða samstarvi á økinum. Arbeitt verður fyri, at Føroyar fáa atlimaskap í ES-skráunum Horizon Europe, Erasmus+ og Creative Europe.

## Mentamál

**Miðlaøkið**
Kringvarpslógin verður endurskoðað. Endamálið er at styrkja ta fólksligu umboðanina og minka um politisku ávirkanina, og tað verður gjørt við at broyta samansetingina av kringvarpsstýrinum. Broytingar verða eisini gjørdar í kringvarpsgjaldinum, so gjaldið hjá smáum vinnufyritøkum lækkar. Kringvarpsgjaldið verður prístalsjavnað. Nýggjur public service sáttmáli kemur í gildi 1. januar 2022.

Miðlastuðulslógin er eftirmett og broytingar framdar. Frameftir verða 70 prosent av miðlastuðlinum latin verkætlanum, sum leggja seg eftir at gera tilfar, ið verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði.

**Tjóðleikhús**
Fyrireikingarnar at byggja nýtt tjóðleikhús á Bursatanga í Havn eru í gongd. Næsta stig er at skriva út arkitektakapping um, hvussu Tjóðleikhúsið skal byggjast í samljóði við valdu staðsetingina. Tórshavnar kommuna fer somuleiðis at skriva út kapping um heildarætlanina fyri økið. Ætlanin er at hava kappingarnar báðar samstundis tíðliga í heyst.

**Fornminni og siðaarvur**
Føroysk feløg, søvn og bátasmiðir hava í fleiri ár arbeitt saman við norðurlendskum áhugafeløgum, søvnum og bátasmiðum um at fáa norrøna súðubygda bátin tilnevndan á UNESCO listan yvir umboðandi siðaarv. Fyrr í ár tók landsstýrið undir við ætlanunum um eina felags norðurlendska tilnevning, sum er handað UNESCO. Gongur eftir ætlan, kemur norrøni súðubygdi báturin á UNESCO-listan í desember 2021.

Arbeiðið at varðveita og verja fornminnini í Kirkjubø er nú komið so mikið ávegis, at veðurverjan, sum varð sett upp í 2003-2004, er tikin niður aftur, og varðveitingararbeiðið upp á Múrin og Líkhús eru um at verða liðug. Arbeiðið at gera bakkaverju framman fyri fornminnini í Kirkjubø er byrjað og heldur fram komandi árið. Arbeitt verður nú við eini ætlan fyri miðlan av fornminnunum og at bøta um atkomuviðurskiftini, so rørslutarnað fáa betri atgongd til fornminnini í Kirkjubø.

**Bókasavnsøkið**
Bókasøvnini hava týðandi mentanarligan, útbúgvingarligan, búskaparligan og sosialan týdning. Bókasøvnini skulu fremja upplýsing, útbúgving og mentanarligt virksemi. Stóru broytingarnar, ið eru farnar fram í samfelagnum síðani aldarskiftið, ikki minst í sambandi við hægri útbúgving og á tøkniliga økinum, hava við sær, at tørvur er á broytingum í bókasavnslógini frá 2001.

**Ítrótt**
Stuðulin til ÍSF er øktur, og tað kemst serliga av, at føroysk ítrótt hevur fingið framúr úrslit á altjóða ítróttapallum. Arbeitt verður framhaldandi fyri at stuðla ÍSF í strembanini eftir føroyskum limaskapi í Altjóða Olympisku Nevndini (IOC).

Í vár varð nýggj lóg um dopingeftirlit samtykt, sum skal hava eftirlit við skipaðum ítrótti og vinnuligum venjingarmiðstøðum. Nýggja lógin hevur somuleiðis við sær, at óreiðilig ávirkan á ítrótt – vanliga nevnt matchfixing – nú verður revsað.

**Skipan við barnaváttan**
Eftir at nýggja danska persónsupplýsingarlógin er sett í gildi fyri ríkismyndugleikarnar í Føroyum, er heimild hjá løgregluni at útflýggja barnaváttanir. Arbeitt verður við eini barnaváttanarlóg, ið fer at seta krøv um at vísa eina barnaváttan, áðrenn persónur kann verða settur í størv, ið hava við børn og ung at gera. Skipanin við barnaváttanum verður eisini galdandi á ítróttarøkinum.

**Fólkakirkjan**
Arbeitt verður við lógarbroyting í løgtingslóg um bygningar fólkakirkjunnar, og arbeitt verður við kunngerð um samsýning til kirkjutænarar og hjálparfólk. Arbeitt verður eisini víðari við málinum um viðlíkahald av prestagarðinum í Sandagerði. Landsstýrismaðurin hevur givið tilsøgn um, at tvey serprestaembæti kunnu setast í Fólkakirkjuni, sum fevna um ein studentaprest og ein diakonprest. Fyrireikað verður at byggja nýggja kirkju á Glyvrum og á Argjum.

## Uttanríkismál

**Trygdar- og verjumál**
Sum land og millumtjóða sáttmálapartur á fleiri økjum eru Føroyar partur av heimssamfelagnum við egnum áhugamálum, skyldum og rættindum.
Føroyar vilja virka fyri, at friður og lágspenningur valda. Sum eitt lítið land uttan formligan avgerðarrætt í trygdar- og verjumálum – og sum partur av danska ríkinum – í eini stórari verjusamgongu verða spurningar um hesi viðurskifti mangan tiknir sum ein sjálvfylgja. Men heldur ikki trygd, tryggleiki ella friður eru ein sjálvfylgja í heimspolitikki.

Sum land í Arktis og Norðuratlantshavi, nú heimsins eygu í alsamt størri mun venda sær henda vegin, er umráðandi, at Føroyar eru tilvitaðar um egna støðu í mun til umheimin. Tað, sum fyriferst í og snýr seg um føroysk øki og grannalag okkara, eigur landsstýrið ikki bara at verða kunnað um, men eisini vera partur av.

Spurningurin um trygdar- og verjupolitikk er serliga vorðin viðkomandi, nú danska stjórnin hevur heitt á landsstýrið um at viðgera spurningin um at seta upp nýggjan lofteftirlitsradara í Føroyum. Landsstýrið raðfestir trygdar- og verjumál. Samstarvið við donsku verjumyndugleikarnar er økt seinnu árini, og ætlanin er somuleiðis at menna samskiftið við NATO, USA og grannalondini Noreg, Ísland og Bretland um verju- og trygdarpolitisk viðurskifti.

**Arktis**
Arktis er heimspartur í broyting, og somuleiðis geopolitiska støða Føroya. Øktur áhugi er fyri arktiska økinum, ikki minst frá stórveldum. Sum partur av Arktis eru Føroyar ein sjónligur, virkin og viðurkendur samstarvsfelagi í millumtjóða samstarvi. Vit eru tilvitað um okkara ábyrgd at finna loysnir og møguleikar í stóru avbjóðingunum, sum eyðkenna støðuna við veðurlagsbroytingum í Arktis. Stevna Føroya er saman við øðrum tjóðum at virka fyri friði og burðardyggari menning í Arktis til tess at tryggja og styrkja okkara tilverugrundarlag. Arbeitt verður tí við eini arktiskari strategi fyri Føroyar, ið ætlandi verður liðug um ársskiftið.

**Handil við umheimin**
Fyri at tryggja føroyskum vørum eins góðar ella betri fortreytir enn okkara kappingarneytar hevur tað stóran týdning, at tollur og aðrar handilsligar forðingar verða burturbeindar. Landsstýrið arbeiðir tí miðvíst við at betra um hesar fortreytir fyri okkara vinnulív. Serliga hava fríhandilsskipanir við lond sum Kina, Japan, Suðurkorea og Evro-asiatisku búskaparsamgonguna, ið eisini fevnir um Russland, høga raðfesting.

**Ísrael**
Sendistova Føroya í Ísrael varð sett á stovn í Tel Aviv í januar í ár. Arbeitt verður millum annað við at skapa vinnulig sambond millum føroyskar og ísraelskar fyritøkur. Eisini verður kannað, hvussu bæði londini kunnu samstarva um nýskapan. Sum liður í at styrkja samstarvið vinnuliga og politiskt, verður skipað fyri eini vinnuferð til Ísraels í heyst. Tá verður hátíðarhald í sambandi við, at føroysk sendistova er staðsett í Ísrael.

**USA**
Í november 2020 undirritaðu umboð fyri amerikansku stjórnina og landsstýrið partalagsyvirlýsing, ið hevur til endamáls at skipa ein formligan karm til tess at styrkja samstarvið millum USA og Føroyar. Síðan hevur tætt samskifti verið við USA um samstarv um vinnu, gransking, útbúgving og mentan. Við støði í partalagsyvirlýsingini verður miðað ímóti at hava formligan fund millum partarnar seinni í ár, annaðhvørt á embætis- ella ráðharrastigi.

**ES**
Føroyar eru partur av Evropa, og Evropasamveldið er við 445 mió. borgarum ein av heimsins størstu búskapum. Landsstýrið ætlar at menna eitt sterkari og meira fjøltáttað samstarv við ES við nýggjum samstarvskarmi millum partarnar. Ein nýggjur samstarvskarmur skal tryggja tættari og meira skipað samstarv við ES, vera við til at bøta um handilsviðurskiftini og samstundis geva okkum møguleikar at víðka samstarvið til onnur øki.

Í fjør sendi løgmaður ES-nevndarforsetanum, Ursulu von der Leyen, bræv, har skotið varð upp, at ein samstarvskarmur verður skipaður ímillum Føroyar og ES. Í svarinum frá ES-nevndarforsetanum varð staðfest, at ES vil styrkja viðurskiftini við Føroyar og er sinnað at taka støðu til uppskot um samstarvs-karm. Uttanríkistænastan hevur orðað og latið uppskot til samstarvskarm millum Føroyar og ES. Ætlanin er latin ES.

**Ísland – Hoyvíkssáttmálin**
Arbeitt verður við at menna handilsviðurskiftini við Ísland og gagnnýta teir møguleikar, sum eru í Hoyvíkssáttmálanum. Tørvur er tó á broytingum í handilssamstarvinum við Ísland, og arbeitt verður við at fáa framt tær tillagingar, sum føroyskt vinnulív sóknast eftir.

**Bretland**
Fríhandilssáttmálin millum Føroyar og Bretland kom í gildi 1. januar 2021. Tey góðu sambondini, vit hava fingið í lag við bretsku stjórnina, geva okkum gott grundarlag at styrkja sínámillum samstarvið, nú Brexit í størri mun letur upp fyri at menna beinleiðis sínámillum samstarv við bretar. Umframt handil og fiskivinnu eru fleiri onnur øki, ið eiga at vera partar av einum felags samstarvskarmi við Bretland, eitt nú útbúgving, gransking, mentan, orka, samskifti og ferðavinna og aðrar tænastur.

**Norðurlandamál**
Landsstýrið hevur sum mál, at Føroyar fáa sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Ásannandi, at sum støðan er, er torført at røkka hesum máli, hevur landsstýrið gjørt av, at fara undir at nýta allar teir møguleikar í Álandsskjalinum, sum eru viðkomandi fyri Føroyar. Millum annað tí tað hevur verið ein vansi í sambandi við umsókn um fullan limaskap, at føroyingar ikki hava brúkt hesar møguleikar. Um ársskiftið fær Bakkafrost fyrsta fult elrikna alibát, sum MEST byggir. Komandi summar verður ætlandi ein jarð- og fjarhitaskipan í Leirvík, ið einans nýtir grøna orku, tikin í nýtslu. Tað eru verkætlanir, sum eru úrslit av okkara felags formansskapi við Danmark og Grønland í Norðurlanda Ráðharraráðnum í fjør.

**Menningarsamstarv og neyðhjálp**
Menningarsamstarv og neyðhjálp hava høga raðfesting í landsstýrinum. Hugsjónini er, at Føroyar sum eitt ríkt og framkomið land skulu taka størri ábyrgd í altjóða samfelagnum og vera við til at menna og hjálpa, har tørvur er. Harumframt er málið at raðfesta føroyska luttøku ovarlaga. Føroysk luttøka er raðfest í viðurkenning av, at Føroyar hava nógv at lata og eins nógv at læra í altjóða samstarvi fyri menning og friði.

## ALMANNA-, JAVNSTØÐU-, FAMILJU- OG BÚSTAÐAMÁL

Almannamál

**Fólkapensjón**
Í hesum samgongutíðarskeiði hevur eydnast at fremja eina søguliga raðfesting á pensjónsøkinum. Flestu fólkapensjónistar hava fingið ein fíggjarliga lættari gerandisdag. Fólkapensjónin er hækkað, fólkapensjónistar hava fingið skattalætta, og samhaldsfasti er hækkaður. Tað gevur einum fólkapensjónisti í dag 1250 kr. meira at liva fyri, enn áðrenn landsstýrið tók við. Umframt hækkingina í sjálvari pensjónini eru reglurnar broyttar, so at tað fer at loysa seg munandi betur hjá fólkapensjónistum at arbeiða. Ein fólkapensjónistur, sum arbeiðir, hevur higartil mist stóran part av pensjónini, men nú er munandi lagaligari hjá fólkapensjónistum at arbeiða.

**Almannatrygd og vælferð**
Um ársskiftið kom løgtingslóg um almannatrygd og tænastur í gildi. Meginreglan í nýggju almannalógini er, at støði verður tikið í tí einstaka; hvat hann megnar, tørvar og vil út frá støðuni, hann er í. Tænasturnar skulu veitast saman við borgaranum heldur enn fyri borgaran.

Stórur dentur verður lagdur á at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, og at borgarin hevur ávirkan á egin viðurskifti. Hóast fyribils ella varandi brek skal bera til at liva eitt so vanligt lív sum gjørligt. Eisini í sambandi við fíggjarlógina fyri 2021 raðfesti landsstýrið fleiri týðandi tættir, til tess at lógin skal virka sum ætlað. Burtur úr rúgvuni kunnu nevnast:

Frá 1. september fer Almannaverkið undir at veita viðlíkahaldsvenjing til fólk millum 18 ár og pensjónsaldur, sum orsakað av breki ella sjúku ikki fáa virkað til fulnar.

Endamálið er at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar. Soleiðis kann borgarin varðveita ella fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Tvær milliónir eru settar av til endamálið í 2021, og tænastan verður útbygd sum frá líður.

Heimaráðgeving, uppsøkjandi arbeiði og samskipan verða styrkt. Higartil hava foreldur, sum eiga børn við autismu, fingið heimaráðgeving. Nú verður henda skipan víðkað til øll foreldur at børnum, sum bera brek.

Almannaverkið fer eisini í størri mun enn higartil at kunna arbeiða uppsøkjandi og samskipa hjálp. Játtanin til hesar tænastur er hækkað 2,1 mió. kr.

Millum tænasturnar, sum eru raðfestar, eru eisini serlig bútilboð til heimleys, víðkað endurvenjingartænasta, hækkað játtan til dagtilhald til minnisveik eins og onnur bútilboð og virknistænastur. Harumframt er eisini raðfest, at Dugni letur upp deild í Suðuroynni.

Lóg um almannatrygd og tænastur, sum avloysir gomlu forsorgarlógina, varð einmælt samtykt í Løgtinginum.

**Depil fyri deyv og hoyriveik**
Arbeitt verður við møguleikanum at skipa ein depil fyri deyv og hoyriveik til tess at betra um tænastuna til hesar málbólkar. Arbeiðssetningur er gjørdur fyri ein bólk, sum skal gera tilmæli til landsstýrið um, hvussu økið kann skipast best frameftir, eisini millum geirar. Harumframt verður eisini farið undir at kanna tørvin á at samskipa taluvenjing tvørtur um geirar.

**Sjúkradagpengar til langtíðarsjúk**
Fíggjarligu umstøðurnar hjá langtíðarsjúkum verða bøttar. Avmarkingin í dagpengalógini, sum er 40 vikur, verður broytt, so at fólk við t.d. krabbasjúkum kunnu fáa dagpening, til tey eru klár at fara aftur til arbeiðis.

**Sjúkradagpengar til pensjónistar, sum velja at útseta pensjónina**
Umleið fimti hvør, sum fyllir 67 ár, velur at útseta pensjónina, og tað er tí, at tey eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Neyðugt er at geva teimum bestu karmar, og tí skulu tey eisini hava rætt til dagpening, um tey eru fyri inntøkumissi vegna sjúku.

**Sorgarfarloyvi til foreldur, sum missa barn**
Sett verður í verk ein skipan við sorgarfarloyvi, har foreldur, sum missa barn yngri enn 18 ár, kunnu fara í farloyvi og fáa endurgjald fyri mista inntøku.

**Barnavernd**
Landsstýriskvinnan raðfestir barnaverndarøkið í 2021. Ein nýggjur stovnur, sum er ætlaður børnum, sum hava verið ella eru í vanda fyri at enda úti í rúsmisnýtslu, er latin upp. Øll neyðug hjálp og viðgerð verður veitt á staðnum. Harumframt eru útvegað fleiri nýggj høli til virksemið undir barnaverndini. Eisini er ætlanin at dagføra barnaverndarlógina, m.a. viðvíkjandi rættinum til ókeypis umboðan, fosturforeldraskipanini og tíðarfreist til § 45 kanningar. Harumframt er ætlanin at gera ymiskar lógartekniskar broytingar.

**Eftirmeting av heimatænastu og eldrarøkt**
Eftirmeting av útleggingini av eldraøkinum er í gongd og væntast liðug um hálvan august. Eftirmetingina gera Almannamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Kommunufelagið, og hon fevnir um heimatænastu, eldrarøkt, samstarvsøki og fíggingarleist.

**Hagtøl fyri heimloysi í Føroyum**
Arbeitt verður við at fyrireika innsavning av hagtølum fyri heimloysi í Føroyum. Innsavningin byrjar í august mánaði, og nágreiniligari upplýsingar verða innsavnaðar árliga, fyrstu ferð fyrst í komandi ári.

**Javnstøða**

**Javnstøða á arbeiðsmarknaðinum**
Tað er umráðandi at økja um tilvitanina um javnstøðu í almenna rúminum, ikki minst á arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðsmarknaðurin er á fleiri økjum kynbýttur, og átøk verða í sambandi við tað. Tað er umráðandi, at ung fólk verða eggjað at velja útbúgvingar og starvsleið sambært áhuga, og tá ið lýst verður eftir fólki til útbúgvingar og størv, at vit venda okkum til bæði menn og kvinnur. Eisini er umráðandi, at fólk hava møguleika at arbeiða fulla tíð.

**Harðskapur og ágangur**
Fyrr í vár vóru úrslitini frá stórari kanning um harðskap løgd fram. Meira enn ein triðingur, 36 prosent, av teimum spurdu hevur verið fyri onkrum slagi av harðskapi. Og 23 prosent – ella meira enn fimti hvør – av teimum spurdu hava verið fyri kynsligum ágangi.

Harðskapur og kynsligur ágangur hava sera álvarsligar fylgjur fyri tey, sum eru rakt. Sambært kanningini eru nógv teirra, sum hava verið fyri kynsligum ágangi, plágað av tungum tonkum, vónloysi, einsemi og trupulleikum í parlagnum. Tey eru eisini í nógv størri mun enn onnur arbeiðsleys ella óarbeiðsfør.

Arbeiðið at basa harðskapi og ágangi er ikki liðugt. Heildarætlanin um harðskap verður endurskoðað og dagførd, og nýggj átøk skulu setast í verk. Landsstýrið ætlar at seta á stovn eitt familjurættarhús, har fólk, sum eru ella hava verið fyri harðskapi ella ágangi, kunnu leita sær hjálp, fáa vegleiðing og ráðgeving. Tá ið um harðskap og ágang um ræður, eigur ein nullhugsjón at ráða.

## Familjumál

**Framtíðarfulltrú**
Arbeitt verður við uppskoti til løgtingslóg um framtíðarfulltrú. Eina slíka fulltrú kunnu fólk stovna, meðan tey framvegis eru frísk og birg. Fulltrúin verður so sett í gildi, um tey seinni gerast sjúk ella onkursvegna ikki longur megna at taka sær av persónligum og fíggjarligum spurningum. Framtíðarfulltrúin verður sostatt ikki sett í gildi, fyrr enn umstøðurnar eru soleiðis, at viðkomandi tørvar hjálp.

Hetta er ein uppraðfesting av sjálvsavgerðarrættinum hjá fólki, sum orsakað av sjúku, viknaðum sinnisligum virkisføri ella viknaðari heilsu ella líknandi ikki longur er ført fyri at taka sær av sínum fíggjarligu og/ella persónligu viðurskiftum. Við eini framtíðarfulltrú ber til at velja og tilnevna ein ella fleiri persónar til í framtíðini at umboða seg og taka sær av sínum persónligu og/ella fíggjarligu viðurskiftum. So leingi fulltrúarveitari sjálvur er førur fyri at taka sær av sínum egnu viðurskiftum, er framtíðarfulltrúin óvirkin.

Endamálið við skipanini er at styrkja um sjálvsavgerðarrættin og gera tað møguligt hjá borgarum undir skipaðum viðurskiftum at hava ávirkan á sítt egna lív og framtíðar viðurskifti, hóast viðkomandi gerst sjúkur ella líknandi. Talan er um eina sjálvbodna skipan og eitt tilboð til borgaran, sum sjálvur ger av, um viðkomandi vil nýta skipanina.

Ein framtíðarfulltrú er sostatt eitt alternativ til verjumál, sum er ein almenn fyriskipan, sum kann setast í verk uttan samtykki, og uttan at viðkomandi, sum verjumálið snýr seg um, verður tikin við upp á ráð.

**Foreldramyndugleiki**
Í samgonguskjalinum er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, so at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa, og at rættindi og skyldur verða staðfestar. Tað verður m.a. gjørt við at víðka um møguleika hjá ógiftum foreldrum at fáa felags foreldramyndugleika og við at geva myndugleikum heimild at taka avgerð um felags foreldramyndugleika.

Sum nakað nýtt fáa myndugleikar heimild til serstakt at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Við hesi heimild fáa foreldrini betri møguleika fyri at varðveita felags foreldramyndugleika, av tí at bústaðurin hjá barninum ofta kann vera tað, sum ósemjan snýr seg um, tá ið foreldrini vilja avtaka felags foreldramyndugleika.

Ásetingarnar um samveru verða nágreinaðar og víðkaðar m.a. soleiðis, at samvera kann ásetast við onnur enn foreldur, sum barnið er knýtt at. Eisini verður ásett, at samveruforeldrið hevur rætt til sjálvvirkandi viðbótarsamveru fyri mista samveru, um bústaðarforeldur hevur forðað fyri samveru uttan haldgóða orsøk.

Við nýggju lógini verða rættindi hjá barninum tryggjað og styrkt. Fyri betur at tryggja, at sjónarmiðini og hugsanin hjá barninum koma fram, fær Familjufyrisitingin heimild at seta í verk barnaserkøna kanning og biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini í sambandi við viðgerð av málum sambært lógini. Eitt barn, sum hevur fylt 10 ár, kann eisini biðja Familjufyrisitingina taka eitt mál upp um foreldramyndugleika, samveru og bústaðin hjá barninum við at kalla foreldrini á fund, har foreldrini og barnið fáa høvi at tosa um foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum og samveru. Í lógini verður tryggjað, at allar avgerðir verða tiknar við atliti at barnsins besta, og at fyrilit skal havast fyri sjónarmiðunum hjá barninum.

## Bústaðamál

**Bústaðapakkin**
Bústaðapakkin varð samtyktur í Løgtinginum í mars, og við lógarbroytingini hava Bústaðir fingið heimild at læna 450 milliónir krónur at arbeiða við komandi árini. 200 milliónir krónur skulu fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar uttan fyri vanliga bústaðamarknaðin, eitt nú búfelagsskapir til fólk við serligum tørvi, barnaverndarstovnar og lestrarbústaðir. Hinar 250 milliónir krónurnar skulu fíggja vanligar íbúðir – saman við øðrum íleggjarum. Harvið fer lánsheimildin hjá felagnum at røkka til munandi fleiri íbúðir enn áður.

Seinnu árini er fólkatalið vaksið nógv og við hesum eisini bústaðartørvurin. Bústaðarmarknaðurin er eisini nógv broyttur og er blivin meira samansettur. Neyðugt verður tí eisini at endurskoða og dagføra verandi bústaðapolitikk.

Eisini er farið undir eina roynd við almennum/privatum samstarvi um at útvega fleiri vardar bústaðir.

**Bygging av vardum bústøðum**
Farið er undir at byggja heimið í Havn til børn og ung við autismu, sum fer at hava seks búpláss, seks umlættingarpláss og eitt virknistilboð til umleið 16 børn og ung. Heimið skal eftir ætlan vera klárt at flyta inn í um ársskiftið 2022/2023.

Farið er eisini undir at byggja sambýlið á Mýrini til fólk við lættari og tyngri menningartarni. Sambýlið fer at hava 18 pláss og verður bygt í trimum eindum. Sambýlið skal eftir ætlan vera klárt at flyta inn í í oktober 2022.

Byggifyrireikingin av varda bústaðnum til fólk við menningartarni og fjølbreki, sum eftir ætlan verður bygt á Argjum, heldur fram og verður eftir ætlan klárt at bjóða út seint í heyst. Verklagslógin verður løgd fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁL

### Vinnumál

**Hjálparpakkar í sambandi við koronufarsóttina**
Koronufarsóttin hevur sett sín dám á vinnuliga virksemið farna árið. Stórt sæð allur heimurin er farin niður í ferð, og føroyingar og føroyskt vinnulív merkja avleiðingarnar á ymiskan hátt. Trupult er at ferðast, og ferðavinnan kring heimin er ein viðfáningur av tí, ið hon var fyri kreppuna. Útflutningsfyritøkurnar hava loftað teimum skeiklingum, sum farsóttin hevur havt við sær á vanligu marknaðunum; trupult hevur til tíðir verið at selja, og prísirnir hava sveiggjað og sum heild verið lægri enn fyri farsóttina.

Heimliga ferðavinnan, sum í 2019 upplivdi stóra framgongd, hevur øðrumegin merkt sviðan av vantandi ferðafólki, men hevur samstundis tikið stór tøk fyri at vaksa um innlendis marknaðin. Føroyingar hava tíbetur tikið væl ímóti nógvu og spennandi tilboðunum, ið ferðavinnufyritøkur hava tikið stig til. Kortini hevur hetta langt frá verið nóg mikið til at viga upp móti afturgongdini í ferðafólkatalinum.

Tí var í vár neyðugt at gera enn eina stuðulsskipan til ferðavinnuna (hjálparpakki 4), sum kundi veita ferðavinnufyritøkum stuðul fyri fastar útreiðslur. Hjálparpakki 4 tók við har, sum hjálparpakki 3 slepti, og varð gjørdur eftir sama leisti, tó við nøkrum fáum ábótum.

Samumtikið kann sigast, at arbeiðið við at gera hjálparpakkar í sambandi við koronufarsóttina hevur gingið væl, og at gott samstarv hevur verið við nógvar ymiskar partar. ALS legði dyggiliga rygg til hjálparpakka 1, tá ið eitt trygdarnet varð spent undir føroyska arbeiðsmarknaðin, og Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur havt eitt serstakliga gott samstarv við TAKS, sum vegna ráðið hevur umsitið

stuðulsskipanirnar eftir hjálparpakkunum 2–4. Eisini hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið alsamt verið í tøttum samskifti við umboð fyri vinnu og vinnufeløg, soleiðis at innan fyri givnu karmarnar hevur borið til at fáa stuðulsskipanirnar at hjálpa sum mest.

**Umsitingarbygningur til Sjóvinnustýrið**

Sjóvinnustýrið, sum í fleiri ár hevur stríðst við hølistrupulleikar, fær nú nýggjan umsitingarbygning. Arbeiðið at gera bygningin varð boðið út í vár, og sáttmáli varð undirskrivaður í juni mánaði. Talan er um ein nútímans 800 fermetra stóra umsitingarbygning. Bygningurin verður staðsettur á Giljanesi, og tískil flytur Sjóvinnustýrið aftur í Vágar eftir at hava húsast í skiftandi leigumálum í Havn seinastu tíðina. Ætlandi verður nýggi bygningurin liðugur um ársskiftið 2022/2023.

**Alivinna í menning**

Løgtingslógin um aling varð í 2018 broytt fyri at lata upp fyri nýggjum møguleikum innan fyri aling. Talan er bæði um at víðka møguleikarnar fyri laksaaling, t.d. við at loyva aling til havs (offshore) og at lata upp fyri eitt nú skelja- og taraaling.

Fyrstu loyvini til vinnuliga taraaling vórðu latin í fjør. Tari er eitt av teimum mest uppløgdu evnunum í eini tíð, tá ið heimurin leitar eftir nýggjum proteinum, eftir nýggjum burðardyggum tilfari at koma fyri plast og eftir natúrligum vælsmakkandi og heilsugevandi mati. Náttúrugivnu umstøðurnar at ala tara eru eisini í heimsflokki. Tarin veksur skjótt og hevur bestu góðsku í okkara reina, livandi og flógva sjógvi. Tí er føroyski tarin eisini høgt í metum, og nógv vildu fegin keypt hann í stórum mongdum, um bara hann hevði vistfrøðiliga merking. Í taravinnuni er vistfrøðilig góðkenning ein greið fortreyt fyri at fáa góðan prís. Tað er tí at fegnast um, at løgtingið játtaði Heilsufrøðiligu starvsstovuni fígging at seta gongd á arbeiðið at skipa vistfrøðiliga góðkenning av tara.

Skeljaaling er meira krevjandi at fáast við. Tvískeljar eru at rokna sum matvøra í serligum vandabólki, tí tær fáa sína føðslu við at síla mat úr umhvørvinum. Bæði evnafrøðilig evni og mikrobiologisk dálking kunnu hópast upp í tvískeljum, ið soleiðis kunnu vera vandamiklar hjá fólki at eta. Um føroyskt aldar skeljar skulu útflytast til eitt nú ES-marknaðin, er neyðugt við heilt neyvum kanningum av ætlaðu aliøkjunum. Fiskaaling og Heilsufrøðiliga starvsstovan arbeiða í løtuni við at skipa neyðugu kanningarnar, so at farast kann undir vinnuliga skeljaaling.

Áhugi er fyri at fara undir aling til havs (offshore-aling), sum verður mett sum ein stórur vakstrarmøguleiki hjá føroyskari laksaaling. Í løtuni arbeiða Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Heilsufrøðiliga starvsstovan við at finna fram til best skikkaða sjóøkið eystan fyri Føroyar. Av tí at talan mest sannlíkt verður um øki, har fiskivinna eisini fer fram, er neyðugt við neyvari hoyring av øllum pørtum, sum verða ávirkaðir av komandi alivirkseminum. Tá ið hesar hoyringar eru lidnar, verður farið undir at bjóða eitt neyvt ásett øki út til havaling, so at áhugaðir partar kunnu fáa loyvi og harvið byrja havalingina á tryggum grundarlagi. Tað er ógvuliga umráðandi, at øll loyvisviðurskifti eru greið, tí talan verður um serstakliga stórar íløgur. Ein meting sigur, at íløgurnar til eina offshore-alistøð eru á leið 1 mia. krónur fyri eina støð, ið kann framleiða 10.000 tons av laksi.

Í vár varð ein frágreiðing um alla alivinnuna fyri fyrstu ferð latin løgtinginum, sí løgtingsmál FG-002/2020. Víst verður til hesa frágreiðingina, sum hevur nógvar áhugaverdar upplýsingar um vinnuna, lýsir lógarkarmar og hagtøl av ymiskum slagi, eins og møguleikar og avbjóðingar verða lýst.

**Vinnulóggáva**
Vinnulóggáva fevnir um eina fjøld av lógum, sum undir einum tryggja karmarnar kring virksemið hjá privatum vinnufeløgum.

Í farna løgtingsárinum vórðu fleiri av mest týðandi vinnulógunum dagførdar. Nevnast kunnu sum dømi, at grannskoðaralógin varð dagførd, so at hon nú er í samsvari við evropeiskar reglur um lógálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum. Somuleiðis vórðu gjørdar neyðugar tillagingar í løgtingslógini um parta- og smápartafeløg, í vinnufyritøkulógini og vinnugrunnalógini.

Nýggj løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti at hvítvaska vinning og fíggja yvirgang varð eisini gjørd. Høvuðsendamálið var at seta í verk seinastu altjóða standardarnar frá Financial Action Task Force (FATF), ið hevur stóran týdning fyri okkara peningaliga samskifti við umheimin. Løgtingslógin um tryggingarvirksemi varð í árinum tillagað, m.a. soleiðis at útlendskir veitarar fingu loyvi at veita sertryggingar, sum ikki verða bodnar út á føroyska marknaðinum, men sum einstøkum tryggingartakarum tørvar. Eisini varð nýggj løgtingslóg um økisnøvn á netinum samtykt. Netøkisnavnalógin skipar greiðar karmar fyri umsitingina og nýtsluna av føroyskum økisnøvnum (.fo) á netinum, ið tryggja atkomu, gjøgnumskygni og gagnnýtslu av tilfeinginum, undir hesum ásetingar um kt-trygd og eftirlit við umsitingini.

Komandi løgtingsár verður ársroknskaparlógin dagførd, m.a. eftir áheitan frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar. Talan er um ein bul í føroyskari vinnulóggávu, ið áhaldandi hevur tørv á endurskoðan og dagføring. Nýggju reglurnar snúgva seg m.a. um varni í sambandi við virðisásetingar, krav um leiðslufrágreiðing fyri roknskaparflokk B, møguleika at lata inn ársfrásøgn á enskum og um at leingja áramálið fyri avskriving av goodwill úr 5 upp í 10 ár.

**Arbeiðsmarknaðarlóggáva**
Í farna løgtingsári eru broytingar framdar í arbeiðsmarknaðarlóggávuni. Í samsvari við samgonguskjalið er barsilstíðarskeiðið økt við 4 vikum, so at barsilstíðarskeiðið nú er 52 vikur tilsamans eftir føðing. At foreldur við útgjaldi úr barsilsskipanini nú kunnu vera um barn sítt í eitt heilt ár, er ein varði í okkara arbeiðsmarknaðarskipanum. Batar eru eisini gjørdir í Arbeiðsloysisskipanini. Mánaðarliga útgjaldið øktist við 1.000 krónum upp í 18.500 krónur, og inngjaldið lækkaði úr 1,25% niður í 1%. Eisini hetta munar hjá nógvum.

**Skapandi vinnur og íverksetan**
Skapandi vinnurnar í Føroyum seta okkum av álvara á heimskortið, og ikki minst eru mongu kreativu fólkini við til at skapa eitt spennandi og livandi umhvørvi, sum dregur fólk til landið, bæði at vitja og at búseta seg.

Í filmsvinnuni gongur sjón fyri søgn. Framleiðslurnar eru fleiri og størri, enn nakar hevði væntað. Filmsvinnan er farin úr nærum ongum upp í nógvar milliónir í framleiðsluvirði eftir bert heilt fáum árum, og bæði leikarar, framleiðarar og tøkningar síggja nú fyri sær, at tað fer at bera til at liva av filmi burturav.

Landsstýrið setti sær fyri, at íverksetaraportalur skal skipast, ið ger tað lættari hjá íverkstarum at leita sær ráð, stuðul og vegleiðing. Portalurin er nærum klárur og verður tikin í nýtslu í næstum. Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Íverksetarahúsið standa fyri arbeiðinum í tøttum samstarvi við allar partar í vinnuframaskipanini, viðkomandi almennar stovnar og Vinnuhúsið.

**Skipasmíð**

Føroyskt skipasmíð er í harðari altjóða kapping við skipasmiðjur í londum, sum hava stórrakstrar-fyrimunir, lægri lønarlag og møguleika at søkja munandi almennar stuðulsupphæddir. Tí er tað eitt bragd, at tað yvirhøvur ber til at hava eina virkna skipasmiðju- og veitaravinnu í Føroyum. Tað ber til, tí føroyska handverkið er gott, og tí vit hava ein heimligan eftirspurning eftir tænastum frá hesi vinnuni. Verandi stuðul til skipasmíð hevur eisini hjálpt til at tryggja, at uppgávur, ið lættliga kundu verið gjørdar uttanlands, í fleiri førum eru loystar í Føroyum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið endurskoðar í løtuni skipanina fyri stuðul til skipasmíð. Serliga verður hugsað um, hvussu skipanirnar frameftir kunnu stimbra undir grønar orkuloysnir. Umhvørviskrøvini gerast fleiri og strangari, og okkara vinna hevur bert møguleika at vera við, um hon megnar at lúka strangastu krøvini til umhvørvi, dygd og álítandi tænastu.

**Tilflyting og integratión**

Fólkatalið veksur, og tað er ein gleðilig gongd. Av teimum, sum flyta til landið, eru alt fleiri útlendingar. Fólk, sum koma higar við nýggjari vitan, nýggjum mentanarligum og vinnuligum íblástri, og sum bøta um stóra tørvin á arbeiðsmegi. Talið á fólki við øðrum enn norðurlendskum uppruna er seinastu 5 árini vaksið við nærum 1000 fólkum, úr 1.400 í 2016, og táttar nú í 2.400 fólkum, ið eru fødd uttan fyri Norðurlond.

Av hesi orsøk gerst tørvurin fyri skipaðari integratión eisini størri. Tí verður nú arbeitt við at gera eina føroyska integratiónslóg. Lógin skal bæði seta teimum krøv, sum vilja búseta seg í Føroyum, og gera greitt, hvørji rættindi útlendingar, sum flyta higar til lands, hava til at fáa ráðgeving, málskeið og aðra hjálp, sum stuðlar teimum at vera javnlíkir borgarar í samfelagnum. Ætlanin er eisini í næstum at taka upp samskifti við danskar myndugleikar, so at galdandi útlendingalóg verður dagførd.

## Umhvørvismál

### Gongd í haga

Føroyingar hava í nógv áratíggju gingið í haga og fjøllum við virðing fyri seyði og fugla- og djóralívi, og uttan at nakar hevur mótmælt. Seinastu árini er talið á ferðafólki vaksið munandi, eins og talið á føroyingum, sum leita sær í fjøllini, er økt stórliga. Tað hevur ført til spenning millum landbúnaðaráhugamál øðrumegin og meira rekreativ áhugamál hinumegin. Lógargrundarlagið, sum hesi viðurskifti eru skipað eftir, er ikki nøktandi, m.a. tí landbúnaðarlóggávan, sum í høvuðsheitum er frá 1937, av góðum orsøkum ikki hevur hugsað um ferðafólk og rekreativa nýtslu av náttúruni.

Ógreiða støðan, sum valdar í løtuni, er ikki haldbar og er við til at geva Føroyum ringt umdømi sum ferðavinnuland. Uttan úr heimi koma kontantar og neiligar viðmerkingar um høgu prísirnar, sum skulu rindast bara fyri at ganga til útvald støð, og tað uttan at onnur tænastuveiting er knýtt at gjaldinum.

Sama hvørja støðu vit hava til spurningin um gongd í haga, so mugu vit ásanna, at málið verður ikki loyst við at trætast um, hvussu galdandi lóggáva skal tulkast. Neyðugt er við nýggjari lóg, sum skipar viðurskiftini á ein hátt frameftir, sum umframt náttúruatlit øðrumegin tryggjar støðugar karmar um ta ferðavinnuna, sum løgtingið hevur samtykt, at vit skulu menna, men sum hinumegin eisini sýnir neyðug fyrilit fyri landbúnaðinum, lokalum vinnumøguleikum v.m. Landsstýrismaðurin hevur tikið stig til eina tilgongd, har umboð fyri bæði ferðavinnu og landbúnað saman við stjórnarráðnum gera eina roynd at finna semju, sum skipar viðurskiftini á ein hátt, sum allir partar kunnu liva við. Eydnast tann tilgongdin, verður lógaruppskot lagt fyri Løgtingið í heyst.

### Orku- og veðurlagspolitikkur

Uppskot til orku- og veðurlagspolitikk 2021-2031 er orðað. Málið er, at Føroyar skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi í minsta lagi 30 prosent í 2031 í mun til 2010. Frá 2010 til 2020 vaks útlátið 35 prosent. Málið um minking komandi 10 árini krevur tí umleið eina helvtarminking í mun til útlátið, sum tað var í 2020.

Orku- og veðurlagspolitikkurin krevur, at stórar og týðandi politiskar avgerðir verða tiknar komandi árini fyri at tálma oljunýtsluni í samfelagnum. 25 átøk eru skotin upp í sambandi við orkuframleiðslu og -nýtslu, bygging og umvæling, ferðslu, handil og vinnu, býarmenning og náttúruvernd. Eisini verður neyðugt við átøkum, sum hava fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan og hin einstaka. Talan er um avmarkingar, gjøld og stuðul fyri at avtaka oljuriknar skipanir og at minka brúkið av HFC-gassi. Avmarkingar og gjøld eru illa dámd politisk stýringaramboð, hóast ógvuliga effektiv fyri at halda kós og ferð móti orkuskiftinum. Tí er ynskiligt at fáa breiða semju um orku- og veðurlagspolitikkin.

Uppskotið til orku- og veðurlagspolitikk hevur verið til almenna hoyring og politiska ráðførslu. Hoyringarviðmerkingarnar eru viðgjørdar í arbeiðsbólkinum og uppskotið tillagað hareftir. Ætlandi verður uppskot til samtyktar lagt fyri Løgtingið miðskeiðis í september. Fyrstu lógaruppskotini, sum seta átøkini í verk, verða løgd fram í hesi tingsetuni. Fyrst fyri eru elveitingarlógin, býarskipanarlógin og náttúruverndarlógin.

**Elveitingarlógin**
Elveitingarlógin hevur 15 ár á baki, og henni tørvar dagføringar, m.a. í sambandi við, at stórar útbyggingar standa fyri framman. Talan er serliga um at útbyggja framleiðsluna av elorku frá varandi orkukeldum og at gera elkervið klárt til at lofta stóru nøgdunum av elmegi, tá ið lagt verður um frá olju- til elriknar skipanir, t.d. í sambandi við hita til sethús. Orkuútbyggingar krevja almenn útboð, atgongd at lendi og sjóøkjum, atlit at náttúru og umhvørvi, eitt vælútbygt og sterkt net umframt intelligentar systemtænastur, sum tryggja, at grøna orkan verður brúkt á skilabestan hátt. Eisini er týðandi at skipa ein elmarknað, sum hóskar til okkara avbyrgdu elskipan.

**Býarskipanarlógin**
Býarskipanarlógin er skjótt 70 ára gomul, og henni vantar ymsar ábøtur fyri at tæna sum karmur fyri nútímans lendisskipan, lendisnýtslu og byggiumsiting. Burðardygg býarmenning fevnir um meira, enn lógin leggur upp til við síni detaljuregulering. Infrakervið til orkuskiftið má leggjast til rættis nú, økta talið av bilum fyri hvørt húski setir krøv til parkeringspláss við bústaðin og í bygdum øki, veðurlags-broytingar seta krøv til kommunalar rørleiðingar, bryggjukantar o.a. Eisini gerst sjóvarmálin alsamt meiri áhugaverdur til havnarløg, útfyllingar, vegagerð, brimgarðar, húsabygging, frítíðarítriv o.a.m.

Býarskipanarlógini vantar eisini samansjóðing við aðra lóggávu, sum heimilar ymsar útbyggingar á landi og sjógvi. Harumframt vantar tilknýti til verndarlóggávu av ymsum slagi, eitt nú lógarvardu økisfriðingarnar sambært náttúrufriðingarlógini frá 1970 og meting um árin á náttúru og umhvørvi í sambandi við inntriv av ymsum slagi. Eisini er neyðugt at dagføra krøvini til almenna hoyring og almannakunngering, so tey hóska seg betur til dagsins samskiftistøkni og elektroniskar pallar fyri miðlan av, hvat er galdandi rættur fyri borgaran.

**Náttúruvernd og náttúrufriðing**
Í heyst verður uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd løgd fyri Løgtingið. Skiftandi landsstýri hava seinastu 20 árini arbeitt við at smíða eina náttúruverndarlóg, tó uttan at tað hevur eydnast at samtykkja hana í tinginum. Flest øll tykjast í dag samd um, at trýstið á náttúruna veksur, tað veri seg orsakað av vinnuligum virksemi, frítíðarítrivi, veðurlagsbroytingum ella øðrum. Tað er tí vorðið átrokandi at fáa nútímans lógarkarmar um náttúruverndina í okkara lítla landi. Lógin hevur til endamáls at verja og røkja føroysku náttúruna við øllum hennara lívmargfeldi, lívøkjum, vistskipanum, dýra- og plantulívi, landsløgum, jarðfrøði o.ø., bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Tættir í løgtingslóg um náttúrufriðing, sum verða fevndir av nýggju løgtingslógini um náttúruvernd, verða strikaðir. Ásetingarnar um loyvi at byggja uttangarðs og í ávísum økjum innangarðs verða varðveittar, og náttúrufriðingarnevndirnar fara framvegis at sita fyri loyvisheimildunum, hóast kommunurnar annars eru byggivald og byggimyndugleiki og skulu geva loyvi til bygging í bygdum sum óbygdum øki.

**Talgilt samskifti og fólkayvirlit**
Til at lætta um m.a. talgilt samskifti millum føroyingar, sum búgva uttanlands, og føroyskar myndugleikar er ætlanin at gera broytingar í løgtingslóg um fólkayvirlit. Endamálið er at fáa heimild at tilluta persónum við donskum heimarætti, men ikki heimahoyrandi í Føroyum, føroyskt p-tal. Harumframt er eisini ætlanin at fáa heimild at skráseta møgulig donsk CPR-nummur í fólkayvirlitinum. Tað er m.a. fyri at tryggja betri samanbinding av føroyskum sjúklingaupplýsingum í Danmark við rætta persón í fólkayvirlitinum.

**Óljóð frá skipum**
Seinastu árini hava nógvir borgarar, sum búgva upp at størri havnarløgum kring landið, verið órógvaðir av lágfrekventum duni, ið sum oftast stavar frá skipum, sum leggja upp ella umskipa veiðu. Felagið Heimafriður hevur áhaldandi gjørt vart við, at her er talan um ein veruligan trupulleika, sum hevur uppiborið at verða skildur frá øðrum spurningum um ljóð, sum natúrliga stendst av virksemi á havnarløgum.

Ætlanin var at seta í gildi kunngerð 1. juli 2021, sum setir ljóðkrøv til skip, sum koma í føroyska havn. Í juni mánaði avtalaðu landsstýrismaðurin og Kommunufelagið tó, at kommunurnar fáa høvi at loysa trupulleikan sjálvar við at áseta felags reglugerð um óljóð frá skipum. Mett verður, at tað er betri loysn, at kommunurnar, sum reka havnirnar, sjálvar taka ábyrgd av avleiðingum, sum standast av virkseminum í føroysku havnunum.

Vónandi fer nýggja reglugerðin at síggja til, at trupulleikin við lágfrekventum duni frá skipum við bryggju minkar burtur í einki. Um nýggja skipanin hjá kommununum ikki ber á mál, kann vendast aftur til ætlanina við at seta í gildi kunngerð.

# LØGLISTI 2021

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya**
Fleiri tættir í lógini verða endurskoðaðir. Umframt heitini á løgtings- og landsstýrismonnum verða fleiri onnur øki endurskoðað, t.d. fíggjarmálsviðurskifti, millumtjóðaviðurskifti, uppgávubýti millum løgtingsumboðsmannin og landsstýrismálanevndina, valrætt til ómynduggjørd, kommunuviðurskifti og um rættarliga og politiska ábyrgd av teim málum, sum løgd eru til sjálvstøðugar nevndir, ið taka endaligar avgerðir.

**Uppskot til løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum**
Endamálið við lógaruppskotinum er 1) at tryggja, at tann, sum eigur fastogn í Føroyum, hevur tilknýti til Føroyar, 2) at tryggja, at útlendingar, sum eiga fastogn í ávísum økjum í Føroyum, ikki verða ov nógvir, og 3) at uppskotið ikki setur óneyðugar forðingar fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum. Talan verður um eina loyvisskipan.

**Uppskot til løgtingslóg um vaktarvirksemi o.a.**
Tað er í løtuni eingin lóggáva, sum setur treytir um førleikar el.tíl. fyri tann, sum rekur eina vaktarfyritøku, ella tann, sum arbeiðir sum vakt. Í uppskotinum skal tann, sum bjóðar fram vaktarhald, hava loyvi frá Loyvisnevndini, og tann, sum skal virka sum vakt, skal eisini hava góðkenning frá Loyvisnevndini. Hetta líkist skipanini, sum er fyri duravørðar í matstovulógini.

**Uppskot til løgtingslóg um Føroya Kærustovn**
Endamálið við uppskotinum er at skipa Kærustovnin sum sjálvstøðugan og óheftan myndugleika. Tað hevur við sær, at 10 kærunevndir og aðrar nevndir verða tiknar av næstu 2 árini, og at ein kærunevnd verður flutt. Við uppskotinum verður serstøk løgtingslóg fyri virksemið hjá Føroya Kærustovni, sum ásetur, hvørji mál stovnurin kann avgreiða og hvussu, eins og ásetingar verða um onnur viðurskifti, so sum óheftni o.a.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini kap. 1–11**
At føroyska og dagføra almenna partin í revsilógini. Í almenna partinum eru reglur um treytirnar fyri at revsa, so sum hvussu gamal gerningsmaðurin er, ríkisborgaraskapur, brotsstaður, neyðverja, saknæmi (tilregnelighed), reglur um brotsroynd, meðvirkni og reglur um dømdu revsingina.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um "straffuldbyrdelseslov for Færøerne"**
Nýggj dagførd lóg verður gjørd fyri revsingarfullgerð í Føroyum.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í konkurslógini**
Lógin verður broytt soleiðis, at reglur um m.a. virkisbann eftir húsagang (konkurskarantenu) og endurreising verða settar inn í lógina.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Skattir, avgjøld o.a.*

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Toll- og skattafyrisiting (skattafyrisitingarlógin)
Landsstýrið ætlar at umskipa Kærustovnin soleiðis, at stovnurin fær fleiri heimildir og fer at virka sum sjálvstøðugur myndugleiki. Ætlanin er at fremja broytingina í stigum í tvey ár. Skotið verður upp at avtaka átta kærunevndir og tríggjar avgerðarnevndir, sum Kærustovnurin er skrivstova fyri, og flyta heimildirnar til Kærustovnin. Í hesum sambandi er neyðugt at gera broytingar í løgtingslóg um Toll- og skattafyristing. Harumframt verður mett, at tíðin er farin frá at hava kommunalar skattakærunevndir. Toll- og Skattaráðið verður eisini tikið av. Gjøld og annað verður sett í skattafyrisitingarlógina. (TAKS vil til dømis fegin, at stovnurin fær heimild til at eftirgeva smáupphæddir í debitorskipanini hjá stovninum.)

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll (tolllógin)**
Nógv orka fer til at tollavgreiða pakkar til privatkundar, sum fraktfeløg ikki hava heimild til at tollavgreiða sjálv. Taks mælir tí til, at speditørar skulu kunna tollavgreiða privatar pakkar sjálvir. Hetta fer at lætta munandi um arbeiðið hjá Taks og eisini hjá fraktfeløgunum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at skatta vinning frá sølu av veiðirættindum**
Við uppskotinum verður staðfest, at tað er "bókaða virðið" og ikki "skattliga bókaða virðið", sum skal nýtast, tá ið javnað verður. Harumframt verður ymist annað nágreinað í lógini.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin)**
Í sambandi við at kapitalvinningsskattalógin varð broytt soleiðis, at rentuhugtakið er nágreinað til eisini at fevna um negativa rentu, verður skattalógin broytt samsvarandi.
Serskipan skal gerast fyri flogfeløg fyri at betra kappingarførið hjá føroysku flogvinnuni á sama hátt, sum eitt nú Malta hevur gjørt.
Harumframt verða broytingar gjørdar sum avleiðing av uppskotinum um Føroya Kærustovn.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at skatta kapitalvinning (Kapitalvinningsskattalógin)**
Ymsar dagføringar. Rentuhugtakið verður nágreinað.
Harumframt verða broytingar framdar sum avleiðing av uppskotinum um Føroya Kærustovn.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (meirvirðisgjaldslógin)**
Dagføringar av ymsum slag. Millum annað í sambandi við ferðavinnu. Hugtakið fólkaflutningur nágreinað.

Mælt verður eisini til at gera tíðarásetingar í sambandi við mvg hjá kommunum soleiðis, at tær gera sína mvg-uppgerð eftir kalendaraárinum, so at samsvar er millum landskassan og kommunukassarnar. Harumframt broytingar sum avleiðing av uppskotinum um Føroya Kærustovn.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at áseta skatt (ásetingarlógin)**
Skattafrádrátturin fyri húsaleigu eftir bruttoskipanini hækkaði úr 50.000 kr. upp í 100.000 kr. frá 1. januar 2019. Tískil eru bara tvey ár liðin, síðani frádrátturin hækkaði. Árið 2020 var nógv merkt av koronufarsóttini, og sera fá ferðafólk komu til landið í 2020 sammett við undanfarin ár. Orsakað av hesum er torført at meta um, hvørt hækkingin í frádráttinum hevur gjørt, at fleiri hús og íbúðir eru vorðin tøk til langtíðarleigu, og hvørja ávirkan koronufarsóttin og fáu ferðafólkini í 2020 hava havt á útboðið av húsum og íbúðum til langtíðarleigu. Tó síggjast ábendingar um, at hækkingin í frádráttinum hevur havt ávirkan. Ætlanin er at leingja verandi skattafrádrátt fyri húsaleigu á 100.000 kr. Støða er ikki tikin til, hvussu nógv ár hesin skattafrádrátturin verður longdur, ella um ásetingin um áramál í lógini verður strikað.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
Farið verður frá at brúka upprunavirðið og yvir til keypsfakturan, keypsprísin, í sambandi við, at skrásetingargjald verður roknað út fyri innfluttar brúktar bilar.
Harumframt verða broytingar framdar sum avleiðing av uppskotinum um Føroya Kærustovn.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur**
Ein samferðslubólkur umboðandi samgonguna arbeiðir við spurningunum um gjøld og ferðastuðul í undirsjóvartunlinum. Bólkurin er ikki liðugur við sítt arbeiði enn, og tí er ov tíðliga at siga, hvørjar lógarbroytingar skulu gerast.
Broytingar í sambandi við stuðul til ferðslu gjøgnum undirsjóvartunlarnar. Stuðulin fyri ferðing gjøgnum undirsjóvartunlar er 8,45 kr. fyri hvønn túr, sama hvønn tunnil talan er um.

**Lógaruppskot í sambandi við uppskot um broytingar í Føroya Kærustovni:**
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lønarhæddaravgjald
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við at skatta inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at umskipa landsskatta-, mvg- og tollskuld o.a. hjá fólki (Skuldarumskipanarlógin)

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2022 (fíggjarlógin)**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýrismaðurin fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2023–2027**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
Sum liður í einari eftirmeting av játtanarskipanini verða ymsar dagføringar og broytingar gjørdar.
**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a.**
Sum liður í at eftirmeta roknskaparverkið verða onkrar broytingar gjørdar. M.a. hevur OECD gjørt eina yvirskipaða greining av roknskaparverkinum og hevði nøkur tilmæli.

*Almennar fyritøkur*

**Uppskot til ríkislógartilmæli um Finansieringsfonden af 1992**
Ríkislógartilmæli um at taka ríkislógina um Fíggingargrunnin frá 1992 av.
Lógin verður sett úr gildi, nú grunnurin er tikin av.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)**
Laga til og dagføra lógina um Realin soleiðis, at ásetingarnar um stovnin verða í betri samljóði við samtíðina. Eisini skal ásetingin um vinningsbýti gerast greiðari.

**Uppskot til broyting í løgtingslógarkunngerð um ferðslu**
Broytingar í ásetingunum um prutl. Ynskiligt er, at farið verður burtur frá koyrikorti til lítið prutl, 30 km/t, og at tað frameftir bara verður eitt koyrikort til prutl, og at tey kunnu koyra 45 km/t. Aðrar broytingar skulu eisini gerast í lógini.

Broyting í § 16 b, sum snýr seg um nýtslu hjá m.a. politinum av handhildnum samskiftistólum í politibilum. Galdandi áseting hevur við sær, at førarar av neyðsynjarakfari, t.d. løgreglubili, sjúkrabili og brandbili, ikki mugu brúka telebúnað/radio, meðan koyrt verður, og hetta hevur við sær stórar avbjóðingar. Áheitan um hesa broyting er bæði komin frá fútanum og frá Føroya Politistafelag. Hetta varð broytt í donsku ferðslulógini í des. 2020.

Broyta áseting um mest loyvda ferð hjá akførum við viðfestivognum, sum eru upp til 750 kg, úr 70 km/t. upp í 80 km/t.

Broyta áseting um mest loyvda ferð hjá bussum úr 70 km/t upp í 80 km/t. Bussar eru stórur partur av vegakervinum, og broytingini hevði havt við sær, at bussarnir betur kundu fylgt við ferðsluni, samstundis sum teir kundu komið skjótari fram.

*Samferðsla*

**Uppskot til løgtingslóg um fámjinstunnil**
Lógaruppskotið um farleið til Fámjins fer í Tingið, tá ið endaligur kostnaður er kendur.

**Uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Havn**
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýrismanninum heimild til at veita fíggjarligan stuðul til nýggja uttara ringvegin til Havnar fyri at bøta um viðurskiftini til og frá meginøkinum, nú ferðslan væntandi fer at vaksa, eftir at Eysturoyartunnilin er tikin í nýtslu.

**Lóggáva um undirsjóvartunlar**
Ein samferðslubólkur umboðandi samgonguna arbeiðir við spurninginum um gjøld og ferðastuðul í undirsjóvartunlinum. Bólkurin er ikki liðugur við sítt arbeiði enn, og tí er ov tíðliga at siga, hvørjar lógarbroytingar skulu gerast.

*Talgilding*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um talgildan samleika**
Í verandi lóggávu er aldursmarkið 15 ár fyri at fáa talgilda samleikan. Ynski er um at lækka aldursmarkið niður í 13 ár.

**Uppskot til løgtingslóg um almennan talgildan post**
Lógaruppskot, ið skal áseta løgfrøðiligu karmarnar um at fáa eina almenna talgilda postloysn í Føroyum.

*Lønar- og starvsfólkamál*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins**
Í sambandi við at hækka fráfaringaraldurin á almenna arbeiðsmarknaðinum er ætlanin at hækka fráfaringaraldurin hjá tænastumonum úr 70 árum upp í 72 ár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir o.a. og at flokka tænastumannastørv**
Broyttar avleiðingar av, at tænastumannalógin verður broytt.

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi**
Tillagingar skulu gerast í lógini í sambandi við, at í seinasta lagi 1. januar 2022 skulu øll veiðirættindi vera knýtt at ávísum fiskifari við ávísum eigara. Tillagingarnar snúgva seg serliga um reglur og treytir fyri at hava veiðiloyvi, reglur um at flyta veiðirættindi millum fiskifør, ásetingar um umlagdar menningarkvotur, umframt ásetingarnar um brúksskyldu, sum fáa virknað á nýggjárinum. Harumframt er ætlanin at leingja gildistíðina á veiðiloyvum við einum ári, so tey eru galdandi til 1. januar 2034.

**Frágreiðing til aðalorðaskiftis um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur í hyggju at fremja**
Sambært sjófeingislógini leggur landsstýrismaðurin fyri 20. februar á hvørjum ári frágreiðing fyri Løgtingið um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om ændring af lov om tvang i psykiatrien"**
Arbeitt verður við at dagføra lóg um tvingsil í psykiatriini. Uppskot er komið frá Sundhedsministeriet, sum verður lagað til føroysk viðurskifti. Millum annað skulu broytingarnar tryggja sjúklingunum størri rættindi, samstundis sum reglurnar fyri, nær ið loyvt er at nýta tvingsil, verða herdar.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "lov om ioniserende stråling og strålebeskyttelse"**
Galdandi lóg í Føroyum um stráluvernd er frá 1930. Síðani tá er nógv hent á økinum, og í 2018 varð í Danmark sett í gildi nýggj lóg um stráluvernd, "lov om ioniserende stråling og strålebeskyttelse", eisini nevnd "strålebeskyttelsesloven". Lógin kann setast í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, og arbeitt verður í løtuni við at tilevna uppskot til kongliga fyriskipan, so at lógin kann verða sett í gildi fyri Føroyar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gransking í mannaílegum**
Ílegulógin kom í gildi í 2005. Nú lógin hevur 16 ár á baki, er tørvur á at endurskoða lógina. Arbeitt varð í 2015 við at gera broytingar í lógini, tá ið arbeiðsbólkur varð settur at skriva álit um "útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum". Í hesum áliti verður víst á fleiri ásetingar, ið eru neyðugar at broyta í ílegulógini. Harumframt er onnur lóggáva sett í gildi, sum krevur broytingar í ílegulógini. Í 2018 varð "Sundhedsloven" sett í gildi í Føroyum og er síðani dagførd. Í donsku lógini eru t.d. ásetingar um "nationalt genomcenter". Hesar ásetingar vórðu ikki settar í gildi í Føroyum, av tí at ynski er um at rætta ílegulógina til soleiðis, at ásetingarnar verða skrivaðar inn í ílegulógina. Álit um

persónlagan heilivág frá 2019 hevur somuleiðis ávirkan á ílegulógina. Eisini eru broytingar gjørdar í "Komitéloven" í undanfarnu tingsetu, umframt at nýggj dátuverndarlóg varð sett í gildi 1. januar 2021, ið alt hevur ávirkan á ílegulógina.

**Uppskot til løgtingslóg um heilivágsútgerð**
Í sambandi við, at arbeitt hevur verið við at dagføra danska heilsulóggávu í Føroyum, er komið framá, at "lov om medicinsk udstyr" ikki kann verða sett í gildi í Føroyum, av tí at talan er um føroyskt málsøki. Tørvur er á at fáa ásetingar í føroyskari lóggávu um heilivág og heilivágsútgerð. Sum er, eru ongar reglur um tað í Føroyum.

**Uppskot til løgtingslóg um fólkaheilsustýrið**
Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sett gongd á arbeiðið við at skipa fólkaheilsustýri, so at verandi orka kann verða nýtt skynsamari til frama fyri heilsuøkið og at betra heilsustøðu føroyinga. Fyrsta stig í verkætlanini er at skriva eina ætlan um, hvat innihaldið í einum fólkaheilsustýri skal vera, og hvussu tað skal skipast. Tá ið ætlanin at skipa Fólkaheilsustýrið er handað landsstýrismanninum í september 2021, verður neyðugt at tilevna lógaruppskot um fólkaheilsustýri.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (umskipa virksemið hjá sjúklingaráðnum)**
Heilsumálaráðið gjørdi í 2020 eina eftirmeting av sjúklingaráðnum. Niðurstøðan sambært eftirmetingini er, at sjúklingaráðið ikki virkar sambært upprunaliga endamálinum. Samstundis verður mælt til, at ráðið verður umskipað soleiðis, at talið á limum verður lækkað, og ásett verður greidligari, hvørjar uppgávur og hvørja ábyrgd eitt framtíðar sjúklingaráð skal hava í sjúkrahúsverkinum, føroyska sjúklinginum til gagns.

**Uppskot til løgtingslóg um at gera goymslu og parkeringspláss o.a. í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum**
Í 2017 varð avgjørt, at kjallarin í H-bygninginum skuldi víðkast frá at vera hálvur kjallari til fullan kjallara at nýta til m.a. goymslu. Hetta verður gjørt fyri at tryggja ein so skynsaman rakstur sum gjørligt frameftir. Eisini er ætlanin at innrætta kjallaran til parkering o.a.

**Uppskot til løgtingslóg um at gera fyrisitingarbygning til Klaksvíkar sjúkrahús**
Fyrisitingin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur ikki tíðarhóskandi karmar. Farið verður tí undir at innrætta húsini frá 1923 til fyrisiting. Talan er um at fáa skrivstovupláss, fundarhøli, viðtaluhøli, arbeiðsklivar og skjalasavn. Tá ið prosjekteringin er liðug, og ætlanin betur lýst, er ætlanin at leggja verklagslóg fyri Tingið.

## UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Uppskot til samtyktar um karmsáttmála um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Ísland
Síðan á sumri 2018 hava samráðingar verið millum Føroyar og Ísland um ein karmsáttmála um samstarv á fiskiveiðiøkinum. Hesin sáttmáli verður grundarlag fyri teimum árligu avtalunum um fiskiveiðirættindi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
Stýrið skal ikki verða valt av politisku flokkunum. Tillagingar í kringvarpsgjaldinum fyri smærri fyritøkur o.a.

**Aðalorðaskifti um public service sáttmálan**
Sbrt. § 11 í kringvarpslógini verður heimilað landsstýrismanninum at gera public service sáttmála við Kringvarp Føroya. Áðrenn sáttmálin verður undirskrivaður, skal landsstýrismaðurin tryggja sær, at Løgtingið hevur havt høvi at umrøða ætlaða innihaldið í sáttmálanum. Kringvarpið og Uttanríkis- og mentamálaráðið hava gjørt uppskot til nýggjan sáttmála at koma í gildi 1. januar 2022.

**Uppskot til nýggja løgtingslóg um bókasøvn**
Stóru broytingarnar, ið eru farnar fram í samfelagnum síðan aldarskiftið, ikki minst innan fyri hægri útbúgving og á tøkniliga økinum, hava við sær, at tørvur er á umfatandi broytingum í bókasavnslógini frá 2001.

**Uppskot til løgtingslóg um barnaváttanir**
Ætlanin er at seta í verk skipan, ið áleggur ávísum arbeiðsgevarum at heinta inn barnaváttan, tá ið fólk verða sett í starv ella í sjálvboðið arbeiði.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Fólkaskúlaráðið hevur gjørt tilmæli til landsstýrismannin um broytingar í fólkaskúlalógini. Við støði í hesum tilmæli verður uppskot gjørt til broytingar í fólkaskúlalógini at leggja fyri tingið á vári 2022. Miðað verður eftir at dagføra tíma- og lærugreinabýtið og at styrkja kreativu og handaligu lærugreinarnar og talgildu førleikar næmingsins.

**Uppskot til løgtingslóg um EUX**
Útbúgvingarmøguleiki skal skipast, sum gevur næmingum møguleika at kombinera yrkisútbúgving og gymnasiala útbúgving. Helst skal hetta skipast við nýggjari lóg.

**Uppskot til samtyktar um at góðkenna sáttmála um føroyskan limaskap í Horizon Europe**
Allar samstarvsskráirnar hjá ES á granskingarøkinum gingu út við árslok 2020, og tí skal nýggjur granskingarsáttmáli gerast við ES. Farið er undir innleiðandi samráðingar, og miðað verður ímóti at undirrita sáttmálan tíðliga í komandi ári. Í tí sambandi skal sáttmálin leggjast fyri Løgtingið til góðkenningar við uppskoti til samtyktar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frískúlar**
Verður dagførd og endurskoðað, millum annað til at rakstrarstuðul eisini fer at umfata útreiðslur til rentur og húsaleigu.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirskúlar**
Verður dagførd. Millum annað við atliti at kravinum um, at eftirskúli eftir trý ár skal hava í minsta lagi 48 næmingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya**
Dagføringar og tillagingar, m.a. at áseta heimild fyri at seta í verk skilhaldsreglur og agatiltøk í sambandi við eitt nú próvtøkusvik.

## ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um framtíðarfulltrú**
Arbeitt verður við uppskoti til løgtingslóg um framtíðarfulltrú. Eina slíka fulltrú kunnu fólk stovna, meðan tey framvegis eru frísk og birg. Fulltrúin verður sett í gildi, um tey seinni gerast sjúk ella onkursvegna ikki longur megna at taka sær av persónligum og fíggjarligum spurningum. Endamálið við uppskotinum er at styrkja um sjálvsavgerðarrættin og gera tað møguligt hjá borgarum undir skipaðum viðurskiftum at hava ávirkan á egið lív og framtíðar viðurskifti, eisini tá ið ein ikki longur er før/ur fyri at røkja egin fíggjarlig og/ella persónlig viðurskifti. Ein framtíðarfulltrú er sostatt eitt alternativ til verjumál.

**Uppskot til løgtingslóg um foreldramyndugleika**
Arbeitt verður við uppskoti til løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru.
Í samgonguskjalinum er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, so at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa, og at rættindi og skyldur verða staðfest. Hetta verður m.a. gjørt við at víðka um møguleika hjá ógiftum foreldrum at fáa felags foreldramyndugleika og við at geva myndugleikunum heimild til at taka avgerð um felags foreldramyndugleika. Somuleiðis verða ásetingar um samveru og bústaðin hjá barninum víðkaðar og nágreinaðar, eins og tað verður staðfest og tryggjað, at allar avgerðir verða tiknar við atliti at barnsins besta, og at fyrilit skal vera fyri sjónarmiðunum hjá barninum, áðrenn avgerð verður tikin.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja vardan bústað til fólk við menningartarni og fjølbreki (Reynstún)**
Ætlanin er at byggja ein vardan bústað til 18 fólk við menningartarni og fjølbreki, sum tey flestu hava rørslutarn og krevja støðuga røkt alt samdøgrið og vilja hava tættan felagsskap við onnur.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjón**
Arbeiðsmegin verður alsamt meira flytfør, og tí er tørvur á at fáa greiðari reglur um at innvinna rætt til almannapensjón og at fáa greiðari reglur um, hvørjar pensjónsveitingar kunnu veitast til pensjonistar, sum fáa føroyska brotpensjón í útlondum. Eisini er ætlanin at gera tað umsitingarliga léttari fyri borgaran at um- og eftirrokna almannapensjón.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku**
Dagpeningur í sambandi við langtíðarsjúku verður veittur longur enn 40 vikur. Broytingin víðkar sjálvbodnu tryggingina soleiðis, at hon eisini fevnir um stjórar í feløgum, sum hava arbeiðsmegi aftrat sær. Tryggingarskipan fyri smærri arbeiðsgevarar verður gjørd. Persónur við framskundaðari pensjón verður javnsettur við fyritíðarpensjonist. Persónar, sum velja at útseta fólkapensjón, skulu frameftir hava rætt til dagpening vegna sjúku.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur**
Ætlanin er at gera eina skipan, sum gevur foreldrum, sum missa barn yngri enn 18 ár, rætt til sorgarfarloyvi. Hetta kann vera veitt sum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.
Løgtingslógin um almannatrygd og tænastur hevur virkað í eina tíð, og tørvur er á ymsum tillagingum, so at lógin kann virka sum ætlað.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Ætlanin er at endurskoða og dagføra barnaverndarlógina við tí í hyggju at bøta um ávís viðurskifti til tess at tryggja børnum og familjum betri kor, m.a. við at styrkja um rættartrygdina og bøta um møguleikarnar at seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk.

**Uppskot til løgtingslóg um brekumboð**
Ætlanin er at gera reglur um eitt brekumboð, sum skal kunna virka óheft og hava eftirlit við, at breksáttmálin verður settur í verk í Føroyum. Harumframt er ætlanin, at brekumboðið eisini skal hava ein upplýsandi leiklut um rættindi hjá fólki, ið ber brek.

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um gongd í haga**
Endamálið er at staðfesta rættin at ferðast í náttúruni og áseta rættindi og skyldur hesum viðvíkjandi. Eisini fer lóggávan at eggja til samstarv millum ferðavinnu og landbúnað.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin)**
Kapping um útbyggingar, elprísir og kunda- og heildartænastur eru týðandi tættir í orkuskiftinum. Tí er ynskiligt, at fleiri feløg halda seg framat at framleiða og selja grøna orku. Kjarnuuppgávan hjá SEV verður framhaldandi at eiga og reka eitt sterkt net og tryggja høga elgóðsku kring alt landið.

V.ø.o. skal komandi lóggávan skilja greiðari millum kappingarútsett virksemi, t.e. elframleiðsla frá vindi og øðrum grønum orkuloysnum, og net- ella skipanartænastur, sum meira natúrliga hoyra til monopolvirksemið hjá SEV.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
Býarskipanarlógin er frá 1954 og treingir til dagføring, m.a. fyri at leggja upp fyri hugtakinum burðardygg býarmenning. Tøtt bústaðarbygging, elektrifisering av samfelagnum, ynski um frílendi og frítíðarhús og atlit at larmi og øðrum vansum frá vinnu- og havnaøkjum seta øðrvísi krøv til kommunala byggimyndugleikan um tilrættislegging av framtíðar býarskipan.

**Uppskot til samtyktar um orku- og veðurlagspolitikk**
Uppskot til orku- og veðurlagspolitikk 2021-2031 er orðað. Málið er, at Føroyar skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi í minsta lagi 30 prosent í 2031 í mun til 2010. Frá 2010 til 2020 vaks útlátið 35 prosent. Málið um minking komandi 10 árini krevur tí reelt umleið eina helvtarminking í mun til útlátið, sum tað var í 2020.

**Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd**
Lógaruppskotið setur nýggjan lógarkarm um føroyska náttúruvernd og hevur til endamáls at verja og røkja føroysku náttúruna við øllum hennara lívmargfeldi, lívøkjum, vistskipanum, dýra- og plantulívi, landsløgum, jarðfrøði o.ø.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing**
Tættir í løgtingslóg um náttúrufriðing, sum verða fevndir av nýggju løgtingslógini um náttúruvernd, verða strikaðir. Ásetingarnar um loyvi at byggja uttangarðs og í ávísum økjum innangarðs verða varðveittar, og náttúrufriðingarnevndirnar fara framvegis at sita fyri loyvisheimildunum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eigaraíbúðir**
Núverandi lóggáva loyvir einans sundurbýti av húsum í eigaraíbúðir, um húsini eru grundað 3. apríl 1970 ella seinni. Skotið verður upp at heimila sundurbýti av húsum, sum eru eldri enn frá 3. apríl 1970, í eigaraíbúðir.

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um tinglýsing**
Skotið verður upp, at heimild verður sett inn í tinglýsingarlógina at tinglýsa skjøl, sum fara at verða kravd tinglýst í persónbókini sbrt. aðrari lóggávu enn sjálvari tinglýsingarlógini. Eisini skulu nakrar tekniskar broytingar gerast.

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um fólkayvirlit**
Endamálið er at fáa heimild at tilluta persónum við donskum heimarætti, men sum ikki hoyra heima í Føroyum, føroyskt P-tal. Hetta fer at lætta um talgilt samskifti millum føroyingar, sum búgva uttanlands, og føroyskar myndugleikar. Harumframt er eisini ætlanin at fáa heimild at skráseta møgulig donsk CPR-nummur í fólkayvirlitinum. Hetta er m.a. fyri at tryggja betri samanbinding av føroyskum sjúklingaupplýsingum í Danmark við rætta persón í fólkayvirlitinum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um djórasjúku**
Lógin skal dagførast, so at hon samsvarar við nýggju djórasjúkulógina hjá ES á teimum økjum, veterineravtalan við ES ásetir, men við fyriliti fyri føroyskum serviðurskiftum. Talan er serliga um fiskasjúkur, ið kunnu ávirka útflutningin av fiskavøru og fiskaúrdráttum til ES. Men talan er eisini um at dagføra aðrar djórasjúkur bæði hjá landbúnaðardjórum, kelidjórum, villum djórum og akvatiskum djórum. Eitt aðalmál er at tryggja standardar fyri heilsu og matvørutrygd fyri alla matvøruketuna, so at lógin er galdandi fyri bæði livandi djór og djóraúrdráttir.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ársroknskap**
Endamálið er at dagføra lógina samsvarandi lóggávuni í grannalondunum. Felagið Føroyskir Grannskoðarar hevur heitt á Umhvørvis- og vinnumálaráðið um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið. Tað snýr seg um eina røð av broytingum, m.a. um meginreglu um varni í sambandi við virðisásetingar, at krevja leiðslufrágreiðing fyri roknskaparflokk B, møguleika at lata ársfrásøgn á enskum, undantak um at brúka dagsvirði fyri ónoteraðar kapitalpartar og leingja áramálið fyri avskriving av goodwill frá 5 til 10 ár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping**
Við nýggju lógini verður arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið greiðari lýst, innførd verða ómaksgjøld fyri samanleggingar, revsiásetingarnar fyri kartelvirksemi verða herdar, og leniency-reglur verða ásettar. Lógarviðmerkingarnar verða endurskoðaðar umframt smærri rættingar.

**Uppskot til løgtingslóg um tøkugjald**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at fremja eina tekniska broyting viðvíkjandi, nær tøkugjaldið á alivinnuna fellur til gjaldingar. TAKS hevur biðið um hesa broyting.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti**
Broytingarnar fevna um panting av frekvensgjøldum, innsavnan av upplýsingum, mastraregulering, kunningartrygd, nummaróheftar sínámillum samskiftistænastur (NUIK-tænastur) og innlit.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging**
Talan er um eina generella dagføring av tryggingarlógini, undir hesum áseting av reglum um kravt talgilt samskifti og varskógvaraskipan v.m. Tryggingarfeløg skulu lata Tryggingareftirlitinum eina røð av skjølum og upplýsingum um ávís viðurskifti hjá feløgunum, antin sum fráboðanir, umsóknir ella annað. Tryggingareftirlitið sendir somuleiðis eina røð av skjølum til feløgini, eitt nú svar upp á umsóknir og eftirlitsreaktiónir, undir hesum boð, átalur og váðaupplýsingar. Sambært uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Tryggingareftirlitinum skal vera talgilt.

Eftir reglunum um varskógvaraskipan skulu tryggingarfeløg hava eina skipan, har starvsfólk gjøgnum eina serliga óhefta og sjálvstøðuga rás dulnevnd kunnu boða frá brotum ella møguligum brotum á tryggingarlóggávuna, eins og hetta á samsvarandi hátt er ásett fyri ymiskar fyritøkur og persónar í nýggju hvítvasklógini.

**Uppskot til løgtingslóg um integratión**
Integratiónslógin hevur til endamáls at skapa karmar um rættindi og skyldur hjá útlendingum, ið koma til Føroya. Somuleiðis verða treytirnar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi tillagaðar, so útlendingur, ið vil hava varandi uppihaldsloyvi, skal hava lokið skeið í føroyskum sum fremmandamáli og samfelagsviðurskiftum. Hetta er fyrsta stig í einum betur skipaðum føroyskum integratiónspolitikki.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn**
Lógaruppskotið hevur sum endamál at broyta skipanina soleiðis, at hon verður effektivari og harvið gerst smidligari og lættari at umsita. Frítíðarkontur verða lagdar til TAKS, og Frítíðargrunnurin verður avtikin.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð**
Lógin skal staðfesta, at landsjørð verður í útgangsstøði einans seld kommunum, sum eru lokali planmyndugleikin. Kommunan selur síðan jørðina til tey endamál, sum byggisamtyktin loyvir, og eftir frammanundan ásettari mannagongd. Í hendinga førum kann Búnaðarstovan selja privatpersónum jørð, t.d. til at rætta mark ella bøta um atgongd at einum stykki ella einum húsum.

Ætlanin er eisini, at avgerðir, sum Búnaðarstovan tekur um at selja ella leiga út landsjørð, frameftir skulu leggjast fyri ein fyrisitingarligan myndugleika og ikki landbúnaðarstevnu við kærurætti til Yvirlandbúnaðarstevnu. Ætlaðu broytingarnar snúgva seg tó bara um tær avgerðir, sum Búnaðarstovan sum almennur myndugleiki tekur eftir løgtingslóg um landsjørð; onnur mál, sum kunnu leggjast fyri landbúnaðarstevnu og Yvirlandbúnaðarstevnu, verða ikki ávirkað av hesi broyting. Somuleiðis verða ásettar greiðar reglur um kærur og kærufreistir í lógini.

**Uppskot til løgtingslóg um mát og vekt**
Tá ið málsøkið mát og vekt varð yvirtikið í 2008, var ætlanin, at føroysk lóggáva skuldi gerast. Hetta er tó ongantíð gjørt, og mett verður nú, at tørvur er á at løgskipa málsøkið við nýggjari heimildarlóg, so at kunngerðarheimildir, uppgávubýti og ásetingar um myndugleikar eru í samsvari við føroysk viðurskifti. Tað hevur serligan týdning fyri útflutningsvinnuna, at lóggávan á hesum málsøkinum er so tíðarsvarandi sum gjørligt. Ætlanin er tó ikki at gera innihaldsligar broytingar í fyrisitingini av málsøkinum.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse ændringer i lov om finansiel virksomhed**
Lógin verður dagførd soleiðis, at nýggjastu ES-krøvini, sum longu eru sett í verk í Danmark, eisini verða galdandi í Føroyum. Talan er um CRD V og CRR 2 reglurnar. Nýggju reglurnar gera tað m.a. lættari hjá bankunum at liva upp til herdu kapitalkrøvini fram móti 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn**
Endamálið við uppskotinum er at gera broytingar í løgtingslóg um starvsviðurskifti hjá sjófólki, so at lógin verður í samsvari við ásetingar í ILO-sáttmálum, ið Føroyar hava staðfest. Talan er um

MLC-sáttmálan um starvsviðurskifti hjá sjófólki (Maritime Labour Convention) og ILO-sáttmála nr. 108 um samleikaskjøl sjófólksins (Seafarers' Identity Documents Convention). Lógarbroytingin styrkir millum annað starvsrættindi hjá sjófólki í sambandi við sjórán.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling**
Til tess at tryggja, at borið kann verða skjótt at, tá ið sloppin alilaksur skal takast úr áum og vøtnum, er ætlanin at fremja lógarbroyting í alilógini, ið styrkir heimildirnar hjá Landsdjóralæknanum, so at Landsdjóralæknin kann krevja, at sloppin laksur verður tikin upp, uttan at jarðareigarar verða spurdir eftir, og uttan at neyðugt er við undantaki frá ásetingini í kunngerðini um síla- og laksaveiðu.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse ændringer i udlændingeloven**
Útlendingalógin, sum er galdandi fyri Føroyar, er ikki broytt stórvegis síðan 2001. Á fleiri økjum er tørvur á broytingum, og tí eigur útlendingalóggávan at verða dagførd. Dagføringar verða gjørdar viðvíkjandi treytum og áramáli fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi, umframt at treytir fyri at fáa familjusamanføring verða dagførdar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skipasmiðjustuðul**
Endamálið við lógarbroytingini er at fáa neyvari ásetingar um, nær stuðul kann veitast, og hvussu stórur partur av arbeiðinum skal gerast í Føroyum, fyri at stuðul kann veitast. Somuleiðis skal stuðulsupphæddin møguliga endurskoðast og nýggj serskipan til grønar orkuloysnir mennast.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum 1. jan., 1985 – 2021 ... 74
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 – 2020 ... 74
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, jan. 2007 – mai 2021 ... 74
**Mynd 4:** Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld (árstíðarjavnað), jan. 2000 – apr. 2021 ... 75
**Mynd 5:** Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2021 ... 75
**Mynd 6:** Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 – mai 2021 ... 75
**Mynd 7:** Lønargjaldingar 12 mðr. rullandi, des. 1985 – juni 2021 ... 76
**Mynd 8:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998 – 2021 ... 76
**Mynd 9:** Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 – 2. ársfj. 2021 ... 76
**Mynd 10:** Tøka av laksi og sílum, 1996 – 2020 ... 77
**Mynd 11:** Innflutningur og útflutningur, 1988 – 2020 ... 77
**Mynd 12:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, 12 mðr. rullandi, jan. 1998 – mai 2021 ... 77
**Mynd 13:** Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, 1998 – 2020 ... 78
**Mynd 14:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 – juni 2021 ... 78
**Mynd 15:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, jan. 2006 – juni 2021 ... 78
**Mynd 16:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 – juni 2021 ... 79
**Mynd 17:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 – juni 2021 ... 79
**Mynd 18:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 – juni 2021 ... 79
**Mynd 19:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 – juni 2021 ... 80

Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum 1. jan., 1985 – 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 – 2020




Kelda: Hagstovan.

Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, jan. 2007 – mai 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4: Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld (árstíðarjavnað), jan. 2000 – apr. 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 5: Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), jan. 1985 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 6: Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 – mai 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 7: Lønargjaldingar 12 mðr. rullandi, des. 1985 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 8: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998 – 2021




* Tølini fyri 2020-21 eru framrokningar.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 9: Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 – 2. ársfj. 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 10: Tøka av laksi og sílum, 1996 – 2020




Kelda: Hagstovan.

Mynd 11: Innflutningur og útflutningur, 1988 – 2020




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 12: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, 12 mðr. rullandi, jan. 1998 – mai 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 13: Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, 1998 – 2020




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 14: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 15: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, jan. 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 16: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 17: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd 18: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.

Mynd: 19: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 – juni 2021




Kelda: Hagstovan.